| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>22. juni 2015 | Blað nr.: 1 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 22. juni 2015 **Kl**. 17:30
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 108/15-134/15

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jjóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**
Sigrun Amalia Mohr

**SKRIVARI:**
Ingunn Eiriksdóttir

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18:00

## 113/15 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 26.02.2015 | 47/15 | 15/00579-1 |
| 2 Býráðsfundir | 26.02.2015 | 22/15 | 15/00579-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 25.03.2015 | 85/15 | 15/00579-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 22.04.2015 | 88/15 | 15/00579-1 |
| 5 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 65/15 | 15/00579-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 170/15 | 15/00579-1 |
| 7 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 113/15 | 15/00579-1 |

**Málslýsing**:
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Góðkent.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 25. mars 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar og mars verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 114/15 Framflyting og meirjáttan íløgur Tórshavnar havn 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.06.2015 | 19/15 | 15/01778-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 144/15 | 15/01778-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 114/15 | 15/01778-1 |

**Málslýsing**:

Samlaði íløgukarmurin fyri Tórshavnar havn í 2015 er 60 mió.
Tað eru fleiri íløgur, sum eru játtaðar í 2013 og 2014, har arbeiðið ikki er liðugt, og koma tí at fara av íløgukarminum fyri 2015.
Íløgur játtaðar í 2013, 2014 og 2015, og sum helst verða útførdar í 2015 eru upp á tilsamans kr. 76.655.455.

| **Projekt** | **Játtan** | **Brúkt áðrenn 2015** | **Íløgur 2015** | **Samlað játtan** |
|---|---|---|---|---|
| Íløgukarmur fíggjarætl 2015 | | | | 60.000.000 |
| Sjóvinnuhúsið | 73.900.000 | 15.578.399 | 58.321.601 | |
| Omankoyring vest bryggja | 2.909.198 | 1.840.972 | 1.068.226 | |
| Fyrireiking Skansabryggjan | 4.000.000 | 2.436.953 | 838.158 | |
| Projektering Skansabryggjan | 6.000.000 | | 6.000.000 | |
| Meirkostnaður Sjóvinnuhúsið | 10.427.470 | | 10.427.470 | |
| Framflutt ikki brúkt játtan 2014 | | | | **1.275.000** |
| | | | **76.655.455** | **61.275.000** |

Meir játtan íløgur 2015 er munurin á kr. 76.655.455 og kr. 61.275.000, sum er **kr. 15.380.455**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at flyta t.kr 1.275 til íløgur 2015, og at hækka íløgukarmin fyri 2015 við kr. 15.380.455.

**Vinnunevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt við fyrstu viðgerð at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 115/15 P/F Faroe Ship ynskir at framleingja grundøkis leigusáttmálan undir skrivstovubygninginum á matr nr 617t á Eystaru bryggju

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 18.05.2015 | 15/15 | 15/01479-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 146/15 | 15/01479-2 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 115/15 | 15/01479-2 |

**Málslýsing**:

P/F Faroe Ship (skrásetingarnr 3852), 100 Tórshavn ynskir at framleingja leigusáttmálan undir skrivstovubygninginum á Eystaru bryggju, matr. nr. 617t. Uppruna leigusáttmálin er frá 1934, og er framlongdur í trimum umførum, seinast fram til 1. januar 2018.

Faroe Ship hevur gjørt stórar ábøtur á bygningin, sum nú er í góðum standi, og hava teir tí ynski um at leingja sáttmálan fram til 1. januar 2028.

Í sambandi við at havnarøkið í framtíðini verður umskipað, kann hetta viðføra at broytingar verða gjørdar tætt upp at ognini.

**Tilmæli**:
Havnarmeistarin mælir til at leingja sáttmálan fram til 1. januar 2028, við hesi viðmerking:
Leigarin skal eisini í framtíðini tola, at tað verða broytingar tætt upp at ognini, uttan at leigarin skal kunna krevja endurgjald fyri møguligan miss.

**Vinnunevndin 18. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 116/15 Innrætting av Saltsølubygninginum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.03.2014 | 2/14 | 14/01679-3 |
| 10 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 116/15 | 14/01679-3 |
| 2 Vinnunevndin | 11.08.2014 | 30/14 | 14/01679-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 14.08.2014 | 215/14 | 14/01679-3 |
| 4 Býráðsfundir | 14.08.2014 | 177/14 | 14/01679-3 |
| 5 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 196/14 | 14/01679-3 |
| 6 Vinnunevndin | 18.09.2014 | 32/14 | 14/01679-3 |
| 7 Fíggjarnevnd | 18.09.2014 | 256/14 | 14/01679-3 |
| 8 Vinnunevndin | 01.06.2015 | 18/15 | 14/01679-3 |
| 9 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 143/15 | 14/01679-3 |

**Málslýsing:**
Innrætting av Saltsølubygninginum

Arbeiðið at klæða saltsølubygningin á Vestaru bryggju, verður væntandi liðugt í august 2013.

Tá tað er liðugt at klæða, ber til at innrætta bygningin av nýggjum. Verðandi innrætting er fyri tað mesta í vánaligum standi, og eigur tí at verða burturbeind og gjørd av nýggjum.

Bygningurin stendur á havnaøki, og er tað tí natúrligt, at hann verður brúktur til virksemi, í hevur samband við sjóvinnu. Hann eigur at innrættast soleiðis, at hann kann brúkast til ymiskar tørvir, og til fleiri smærri og kanska onkra miðalstóra fyritøku.

Leiguupphæddin verður avspeglað í íløgukostnaðinum, tí skulu loysnir finnast, har tað er ein standard leigupakki, hvar tað so er møguligt at velja ymiskar kvalitetir til.

Mælt verður til gera byggiprogram og dispositiósuppskot.

Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera byggiprogram og dispositiónsuppskot. Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot, verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Vinnusamskiparin á Tórshavnar havn leggur fram uppskot til leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum, sum nevndin síðani umrøður og tekur støðu til.

**Vinnunevndin 2. august 2013:**
Nevndin samtykti at heimila umsitingini at arbeiða víðari eftir framlagda leisti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at at taka undir við uppskotinum, og at leggja tað alment fram, soleiðis at møguligir leigarar kunnu geva sín áhuga til kennar.

**Vinnunevndin 26. august 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til byggiprogram og dispotiónsuppskot er gjørt og undir einum nevnt skipanaruppskot.

Tað samlaða skipanaruppskotið er goymt undir journal nr. 2013-1269.

Úrdrag úr skipanaruppskotinum:
Bygningurin er í 5 hæddum, sum skulu innrættast til 2.799 $m^2$ skrivstovur, 288 $m^2$ til WC/brúsurúm, 2.152 $m^2$ til felagsøki/trappur, 710 $m^2$ til goymslu, 360 $m^2$ til verkstað, 75 $m^2$ til tøknirúm, 579 $m^2$ til matstað og 238 $m^2$ til annað.

Uppskotið leggur upp til, at smærri fyritøkur kunnu deilast um ávísar felags funktiónir, so sum fundarhølir, prent, kantinu o.s.fr.
Nakrar kjarnur verða gjøgnumgangandi á øllum hæddum, t.e. trappur, wc og slokur til innleggingar.

Góðskustøðið á ymsu økjunum verður fjølbroytt. Av tí, at verkstøð og goymslur skulu virka í sama bygningi sum matstova og skrivstovur, verður spennið stórt millum rá arbeiðsrúm og tignarlig fundarrúm.

Ætlanin er, at nýbyggingin skal liva upp til øll dagsins krøv til nýmótans altjóða skrivstovu umhvørvi, samstundis sum spor av gamla saltsølubygninginum verða varðveitt. T.d. er ætlanin, at innsíðan av útveggjum eru gomlu betongveggirnir, sum bert verða pussaðir og málaðir.

Skrivstovuøkini liggja fram við útveggjunum, við undantak av á 1.- 2.- og 3. hædd, har onki ljós kemur til í tí partinum, sum vendir norðureftir móti Bacalao. Skrivstovuøkini verða skyldraði frá høvuðsgongdini gjøgnum bygningin, men ikki deild upp í smærri skrivstovur. Loysnir fyri uppdeiling í smærri skrivstovur skal finnast, sum so leigarin ger eftir tørvi.

Bygningurin verður upphitaður við sjógvhita.

Mettur kostnaður til projektering er kr.3.653.000, umframt kr.527.000 sum er brúkt til skipanaruppskot og fyrireiking.
Projekteringin tekur umleið 4 mánaðir.

Byggingin tekur væntandi 18 mánaðir, frá undirskriving av arbeiðstøkusáttmála til avlevering.

Mettur kostnaður fyri innrætting 59 mió.

**Útleigan**
Aftan á at leigukonseptið fyri bygningin hevur ligið alment frammi, hevur tað verið ein ávísur áhugi fyri at leiga í bygninginum, men tað eru ikki allir leigararnir, sum hóska so væl til ætlaninar, tað at fyritøkurnar í høvuðsheitum skuldu arbeiða við sjóvinnu og menning av hesari.

Um tað verður leigað til øll tey, sum hava víst áhuga, er bygningurin fult útleigaður. Mælt verður til at leiga út til tær fyritøkurnar, sum vit halda passa til konseptið, fyri eisini at geva pláss til meira hóskandi leigarar, sum koma við tíðini.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, og at játta kr. 4,18 mió til skipanaruppskot og endaliga projektering, og at arbeiðið eftirfylgjandi verður bjóðað út í innbodnari fakenterprisu.

Mælt verður eisini til, at gera eitt sokallað «memorandum of understanding» við tær fyritøkurnar, sum hóska til konseptið, soleiðis at tær kunnu flyta inn í bygningin, tá hann er liðugt umvældur.

**Vinnunevndin 25. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og játta kr. 4,18 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskot til skitsuprojekt er gjørt, og verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at góðkenna skitsuprojektið

Umboð fyri SNA Arkitektar kemur á fundin at greiða frá.

**Vinnunevndin 10. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umboð fyri SNA Arkitektar greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari fakenterprisu. Tilboðini vóru opnaðið tann 16. juni 2014.

Áðrenn farið varð undir projektering av innrætting, varð samlaði kostnaðurin mettur til kr. 59 mió.

Beint áðrenn tilboðini vórðu opnaðið, metti rágevarin at kostnaðurin bleiv kr. 64,5 mió, umframt ókent og projektering/eftirlit.

Fyri at fáa kostnaðin nakað niður hava samráðingar verið við teir, sum høvdu tey lægstu tilboðini, umframt at sjógvhitin og fyrilestrarsalurin í siloni er tikin burtur úr projektinum.
Ístaðin fyri sjógvhita, er gjørt klárt til at binda í ein møguligan framtíðar fjarðhita.

Samráðst hevur verið við allar teir, sum høvdu lægsta tilboðið, uttan ElNet, sum er í summarfrí. Sáttmálaupphæddin fyri el, er tí ein meting.
Aftan á samráðingar er støðan hendan:

| Slag | Arbeiðstakarar | Meting 2013 mió kr. | Meting 2014 mió kr. | Tilboð mió kr. | Sáttmáli mió kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Bygnings** | Húsavarðatæn. | | 26.3 | 35.4 | 32.5 |
| **Gólv** | Jims Gólvålegging | | 2.4 | 3.2 | 2.1 |
| **Málari** | Uni Zacariasen | | 2.0 | 1.7 | 1.6 |
| **Múrari** | Articon | | 5.7 | 8.3 | 5.2 |
| **El** | ELNet | | 11.2 | 9.4 | 8.6 |
| **HVS** | Renovent | | 16.9 | 17.5 | 14.5 |
| **Arbeiðstøku-upphædd** | | | **64.5** | **75.5** | **64.5** |
| **Trygging,ókent, eftirlit o.a** | | | | | 9.4 |
| **Saml. kostn** | | **59.0** | | | **73.9** |
| | | | | | |

Um so er, at tað í byggitíðini verður tikið støða til, at gera fyrilestrarsalin lidnan, kann hettar gerast fyri 4.5 mió kr.

Um tikið verður undir við at innrætta fyri 73,9 mió kr., er samalði kostnaðurin fyri innrætting og klæðing umleið 94 mió.
Hetta merkir, at vit fáa 7.100 $m^2$ fyri góðar 13.200 kr/$m^2$

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at gera arbeiðtøkusáttmálar sambært nevnda uppskoti, og at játta 73,9 mió kr, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

**Vinnunevndin 11. august 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 14. august 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at taka undir við vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 14. august 2014:** Marin Katrina Frýdal setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, og at málið verður beint aftur í vinnunevndina til at útvega neyðuga fígging.

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið hjá Marinu Katrinu Frýdal at beina málið aftur í nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og fimm ímóti, meðan 4 býráðslimir ikki greiddu atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Jákup Dam.

Jógvan Arge setti síðani fram soljoðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

Broytingaruppskotið hjá Jógvani Arge fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti. 2 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov og Sigrún Mohr.

Borgarstjórin setti síðani fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við vinnunevndini við teirri broyting, at spurningurin um endaliga orkuloysn verður lagdur fyri býráðið aftur í seinasta lagi um tveir mánaðir.

Broytingaruppskotið hjá borgarstjóranum varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti, og 3 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
SNA, sum hevur staðið fyri projekteringini av bygninginum, hevur saman við SMJ, sum hava staðið fyri projektering av hitaverkinum, gjørt eina meting av meirkostnaðinum fyri at brúka sjógvhita til upphiting, og hvussu nógv ár ganga, til íløgan er afturgoldin. (sí skjal j.nr. 14/01679-9)

Meirkostnaðurin er mettur til kr. 4.177.470.

Mett verður, at íløgan er afturgoldin um á leið 30 ár.

**Vinnunevndin 18. september 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, mælir býráðnum til at hita bygningin við sjóhita og at fíggja meirútreiðsluna við møguligum sparingum á projektinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 18. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Ískoyti:**
Vinnunevndin samtykti á fundi tann 18. september 2014 at hita bygningin við sjóhita, sum kostaði kr. 4.177.470,- og at hetta skuldi fíggjast við sparingum. Tað hevur ikki eydnast at finna neyðugar sparingar.

Fyrilestrarsalurin, sum er tann ovasti parturin av siloini, bleiv tikin burtur úr projektinum, men hesin kundi verða tikin innaftur í projektið fyri 4,5 mió.
Fyrilestrarsalurin hevur í verðandi uppskoti ikki vindeygu. Um fyrilestrarsalurin hevur vindeygu, kann hann nýtast til ymisk endamál. Íseting av vindeygum kostar 1,25 mió.
Fyri at fáa meira nyttu burtur úr húsinum, er fyrilestrarsalurin ein týðandi partur.

Óvantaðar útreiðslur av at byggja fyrilestrarsal v.m í restini av byggitíðini eru mettar til 0,5 mió.

| Meirkostnaður: | |
|---|---|
| Sjógvhiti | 4.177.470 |
| Fyrilestrarsalur | 4.500.000 |
| Vindeygu | 1.250.000 |
| Óvantað | 500.000 |
| Samlað | 10.427.470 |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at samtykkja at játta kr. 10.427.470 til liðugtgerð av Sjóvinnuhúsinum, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn 2015.

**Vinnunevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 117/15 Eysturskúlin : Høvuðsumvæling 2. byggistig - Fyrispurningur til arbeiðstakarar um útbjóðing

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.03.2014 | 30/14 | 14/00415-24 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.03.2014 | 47/14 | 14/00415-24 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 40/14 | 14/00415-24 |
| 4 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 144/15 | 14/00415-24 |
| 5 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 155/15 | 14/00415-24 |
| 6 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 117/15 | 14/00415-24 |

## Eysturskúlin – høvuðsumvæling

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Húsaumsitingin er farin í holt við at umvæla Eysturskúlan. A og B lonirnar eru gjørdar, og nú vanta C, D og E lonirnar.

Húsaumsitingin saman við arkitektinum hava verið á fundi við leiðsluna í skúlanum fyrr í ár. Leiðslan ynskti at E lonin varð gjørd fyrst, tí tey mettu hesa verða mest átroðkandi. Nøkur vindeygu eru skrúvaðið føst fyri ikki at detta úr. Havandi í huga at hesi eisini virka sum fluktvegir út á takið, er skilagott at gera hetta arbeiðið fyrst.

Sambært fyribils kostnaðarmeting verður hetta arbeiðið mett at koma at kosta uml.10 mill. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir arbeiðið á E-lonina. Hetta merkir, at aftrat teimum 5 mill. kr,. sum Húsaumsitingin hevur sett av til Eysturskúlan í ár, verður neyðugt at kunna seta 5 mill. kr. av játtanina til konto 82 í komandi ár til Eysturskúlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Húsaumsitingin hevur heitt á ráðgevan A3 v/Hans Dávid Dam, ark. og biðið hann gera útbjóðingartilfarið fyri C lonina umframt tekjurnar, sum leiðslan ynskti (ikki E lonin hetta er ein misskiljing).

Innboðin lisitatión varð hildin og inn komu 3 tilboð. Tilboðini lógu upp á 12,9, 14,3 og 17,7 mió. kr. Lægstur við kr 12.938.329,00 lá Sp/f Karstin A.Joensen, byggimeistari í Kollafirði. Meting okkara var 12.027.035 mió. kr.

Fyri lítlum ári síðani fingu vit samlað tilboð frá spf ÁTS fyri bygningspartarnar C, D og E, og var hettar upp 20,9 mió. kr. - Fyri bygningspart C + tekjurnar, skuldi hettar givið kr. 12,6 mió. kr.

Ráðgevin hevur mælt til at taka av lægsta tilboðnum. Umsitingin hevur gjørt samlaða kostnaðarmeting, íroknað ókent, prístalsreguleringar, prosjekt, eftirlit og byggileiðsla og mvg, og er samlaði kostnaðurin mettur at blíva kr. 16.633.839,22, (skjal 2007-0625/4).

Upprunaliga varð roknað við at játtanin til hetta arbeiði skuldi verða av konto 82, umsiting av bygningum. Men í samband við fíggjarætlan fyri 2008 var avgjørt at talan var ikki um vanligt viðlíkahald, men heldur um eina íløgu í dagføring, og var tí avgjørt at játtanin fyri 2008 til hetta arbeiði skal av íløgum fyri 2008.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum, og at játtaðar verða kr. 16.633.839,22 av íløgum fyri 2008, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2007:** Útsett.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tilboðið, sum víst verður til í tilmælinum omanfyri, verður fíggjað av íløgum fyri 2008 kr. 13.785.000,00, restupphæddin kr. 2.848.839,22 verða goldnar av konto 82, umsiting av bygningum, skúlamál.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 13.785.000,00 av íløgum fyri 2008.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
C lonin í Eysturskúlanum var liðugt høvuðsumvæld í 2008, sostatt eru A, B og C lonirnar umvældar.
Tá umvælingin av C lonini var liðug, varð í samráð við skúlan avgjørt at bíða eina tíð við framhaldandi umvælingunum, tí skúlin metti, at høvuðsumvælingin órógvar dagliga arbeiðið í skúlanum so mikið, at tørvur var á einum steðgi í eini tvey ár.

Tann tíðin er farin nú, og mælt verður tí til, at høvuðsumvælingin verður tikin upp aftur, og at farið verður í gongd við D lonina.

Ráðgevin metir, at kostnaðurin fyri projekteringina er 314.000 kr. uttan mvg. Við mvg og við at leggja nakað aftrat til óvæntað, verður metti kostnaðurin fyri at projektera liðugt og gera klárt til útboð 370.000 kr.

Gerast skal ein ráðgevarasáttmáli um projektering og eftirlit við høvuðsumvælingini. Ráðgevin, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar, hevur neyva vitan um bygningin og verkætlanina sum heild, og tí verður viðmælt, at heimild verður givin at gera sáttmála við hann aftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við ráðgevan, sum tók sær av hesi uppgávu, tá hinar lonirnar vórðu umvældar.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 370.000 kr. verða játtaðar av konto 4175, Dagføring av skúlum, til projektering av høvuðsumvæling av D lonini í Eysturskúlanum, soleiðis at hetta umvælingarstigið kann bjóðast út.

**Mentamálanevndin 1. desember 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og játta kr. 370.000 av íløguætlanini fyri 2011.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Fundur hevur verið við leiðsluna í Eysturskúlanum um høvuðsumvælingina av D-lonini. Á fundinum greiddi ráðgevin frá umvælingarætlanini, og skúlin hevði møguleika at gera viðmerkingar.

Ráðgevin hevur projekterað og gjørt kostnaðarmeting. Høvuðsumvælingin fevnir í høvuðsheitum um útveggir, máling innan, nýtt linoleum á gólvini, eftirbjálving, bøtta brunatrygd, gardinur, hitaskipan, el-hurðalæsiskipan og goymslurúm til klor, sum verður brúkt í svimjihylinum.

Sambært kostnaðarmeting, sum er í málinum, verður samlaði kostnaðurin kr. 11.572.412,11.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina í august 2012, og arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 11.572.500 kr. av konto 4175, Dagføring av skúlum, til høvðusumvælingina av D-lonini í Eysturskúlanum

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari lisitatión. Inn komu fýra tilboð, og var lisitatiónin mikudagin 27. august 2012.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| P/f Articon | kr. 7.110.925,00 |
| Sp/f Bjarni Poulsen | kr. 8.373.795,00 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | kr. 6.711.394,00 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | kr. 7.969.578,00 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 6.711.394,-

Býráðið hevur áður játtað hesar upphæddir til umvælingararbeiðið:

| | |
|---|---|
| 16. des. 2010: | kr. 370.000,00 |
| 28. juni 2012: | kr. 11.572.412,11 |
| Tils. | kr. 11.942.412,11 |

Umsitingin hevur eftirfylgjandi gjørt samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, prístalsregulering, prosjektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 2012-0511/22, og metir, at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 5. september 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. september 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 13. september 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Høvuðsumvælingin av D-lonini er í gongd, og sambært tíðarætlanini verður arbeiðið at umvæla D-lonina liðugt í mai.

E-lonin er eftir at høvuðsumvæla, og mett verður skilagott, at høvuðsumvælingin heldur fram soleiðis, at tá D-lonin er liðug, kann farast undir umvælingina av E-lonini. Kann hetta arbeiðið fara í gongd í mai-juni, fer tað ikki at órógva skúlagongdina so nógv, tí tá eru próvtøkur. Nám X heldur til í E-lonini, og skúlin metir, at tað ber til at skipa próvtøkurnar hjá teimum í øðrum hølum í skúlanum, meðan umvælingin fer fram.

Um umvælingin ikki fer í gongd í mai-juni, verður neyðugt at finna onnur høli til Nám X í umvælingartíðini og helst fáa til vega játtan til leiguútreiðslur.

Metti kostnaðurin fyri projektering til liðugt útboð, eftirlit, byggileiðslu, bygningsumvælingar, tilfar, arbeiðsløn, projektumsiting og til óvæntað er 6.824.509 kr. v/mvg à 6,25%. Íroknað hesa upphædd eru eisini útreiðslur til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009), sum greitt er frá niðanfyri.

Mett verður skilabest at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt allar hinar partarnar av høvðusumvælingina av Eysturskúlanum um hendi. Tí verður biðið um heimild at gera sáttmála við hann um projektering og eftirlit við høvðusumvælingina av E-lonini.

Ætlanin er at fara í gongd við umvælingina, tá D-lonin er liðugt umvæld, og ætlanin er, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión.

Viðvíkjandi D-lonini er møguleiki, at verandi ventilatiónsverk verður skift út við eitt nýtt, sum hevur hitaendurvinning við roterandi hitavekslara. Meirkostnaðurin fyri at velja hesa skipan, heldur enn hana, sum er í ætlanini, er 334.687 kr. Men mett verður, at meiríløgan verður afturgoldin í minni orkunýtslu yvir seks ár.

Í íløguætlanini fyri 2013 konta 4175 Dagføring av skúlum eru kr. 2 mió settar av til E-lonina, men roknað hevur verið við eisini at brúka avlop á løgukarminum fyri 2012 til endamálið. Har standa kr. 4,867 mió tøkar, tvs. samlaði løgukarmurin er kr. 6.867.000. Fígging er sostatt tøk á kontu 4175 Dagføring av skúlum til umvælingina av E-lonini og meirkostnaðin fyri annað ventilatiónsverk í D-lonini, í alt kr. 6.824.509.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at heimild verður givin at gera sáttmála við sama ráðgeva, sum hevur havt uppgávuna í sambandi við ymsu lonirnar annars, og at tað av íløgukontu 4175 Dagføring av skúlum verða játtaðar kr. 6.824.509 til høvuðsumvælingina av E-lonini, harav tó kr. 334.687 til ventilatiónsverk í D-lonini (L41009).

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Kunnað varð um málið

**Ískoyti**
Í Sambandi við dagføring av E-lonini í Eysturskúlanum varð ráðgevara sáttmálið um projektering, byggileiðslu og uppfylging undirskrivaður 12.juni 2013.

Arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión. Lisitatiónin var týsdagin 25. mars 2014.

Úrslitið varð:

| Arbeiðstakarar | Tilboð uttan mvg |
|---|---|
| spf Karstin A Joensen | Kr. 4.675.475,85 |
| Sp/f ÁTS v. Karstin Vang | Kr. 5.122.955,44 |
| Sp/f Húsavarðartænastan | Kr. 5.131.776,40 |
| Bjarni Poulsen | Kr. 5.607.746,00 |
| Spf Valbjørn Dalsgaard | Kr. 5.669.305,47 |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og hevur staðfest, at øll tilboðini eru kvalifiserað. Ráðgevin mælir til at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi kr. 4.675.475,85

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri alt arbeiðið, íroknað handverkaraútreiðslur, inniklima, projektering, eftirlit, byggileiðslu, projektumsiting, ókent og mvg, j. nr. 14/01693 og mælir til at kr. 1.200.000,00 verða fluttar frá avlopi á L 41009, D-lonin, til L41008, E-lonin, soleiðis at arbeiðið kann gerast innanfyri áður játtaða fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at kr. 1.200.000,00 verða fluttar frá avlopi á L 41009, D-lonin, til L41008, E-lonin.

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla eisini til at taka av lægsta tilboðnum, at heimila umsitingini at taka upp samráðingar og gera sáttmála við lægsta tilboðsgevaran og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 03. mars 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 3. mars 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 4. mars 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skal eftirmeting gerast av lidnum verkætlanum og leggjast fyri avvarðandi nevnd, fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Umvælingin av lon D og E á Eysturkskúlanum er nú liðug og verkætlanin verður lokað. Samlaða avlopið er kr. 2.164.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at verkætlanin verður lokað og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið till kunningar. Víst verður somuleiðis til mál 14/00434 Innbúgv til Hoyvíkar skúla um at játta kr. 390.000 av omanfyri nevnda avlopi.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum soleiðis, at avlopið fellur til løgukarmin á grein 4, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 118/15 Forskúli í Skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 131/15 | 14/00420-24 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 164/15 | 14/00420-24 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 118/15 | 14/00420-24 |

**Málslýsing**:
Í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum á Argjahamri, sendi skúlastýrið í Argja skúla áheitan á kommununi at arbeiða fyri, at forskúli varð settur á stovn í Skúlanum á Argjahamri.

Sambært fólkaskúlalógini § 4, stk. 4 kann verða loyvt kommunum at seta forskúla á stovn.

Sambært § 10 skulu børnini í forskúlaflokki verða kunnað um dagliga lívið í skúlanum, læra at vera í skúla og vera trygg við undirvísingarstøðuna. Virksemið í forskúlanum fer fram í samspæli millum leik og læring. Børnini skulu læra grundstøðið undir lesing, skriving og rokning. Skipað samstarv skal verða millum lærarar og pedagogar. Í § 18 verður staðfest, at dagliga undirvísingartíðin má í mesta lagi vera 6 tímar.

Eitt uppskot til kunngerð um forskúla hevur verið til hoyringar hjá kommununum og øðrum, sum vara av skúlanum. Sambært uppskotinum skal forskúlaflokkur hava tilknýti til ein fólkaskúla og vera í sama bygningi sum skúlin. Skúlaleiðarin hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum og setir og loysir úr starvi starvsfólkini í forskúlanum. Kommunan ber allar útreiðslurnar av forskúla.

Kunngerðin er ikki lýst enn, men verður brúkt sum grundarlag eitt nú í forskúlanum í Eysturkommunu. Umframt Eysturkommunu og forskúlan í Sankta Farns skúla, so eru forskúlar eisini í Kelduni í Skálafirði og á Skála (Runavíkar kommunu).

Í Sankta Frans skúla kom forskúlin í 1963, og tá Tórshavnar kommunu í 1985 tók umsitingina av skúlanum á seg, helt forskúlin fram og hevur verið í Sankta Frans skúla síðani. Forskúlin er nú í smábarnaskúlanum, sum varð tikin í nýtslu í august 2011, og bygdur til endamálið.

Tá Skúlin á Argjahamri varð bygdur, var ætlanin, at hann eisini skuldi rúma forskúla. Tvær skúlastovur vórðu settar av til endamálið. Í dag brúkar frítíðarskúlin hesar stovurnar, tó so, at fyrrapart standa tær tómar. Ætlanin er, at forskúlanæmingarnir eisini eru í frítíðarskúla í skúlanum, sostatt fara forskúli og frítíðarskúli at brúka somu høli. Umframt báðar stovurnar er ætlanin, at økið í stóru gongini beint uttanfyri tær verður skipað til ymisk verkstøð, soleiðis at forskúli og frítíðarskúli kunnu brúka tað økið eisini.

Tá forskúli og frítíðarskúli eru í sama bygningi og í somu hølum, er skilnaður millum skúla og frítíðarskúla ikki so eyðsýndur, og dagurin hjá næmingunum kann í størri mun skipast sum ein heild. Ein sjálvsagdur møguleiki er eisini, at pedagogar í forskúla og frítíðarskúla kunnu vera teir somu, og lagt er upp til, at skúlin og frítíðarskúlin samstarvað um forskúlan.

Leiðslan á skúlanum og leiðslan á frítíðarskúlanum hava arbeitt við uppskoti til konsept, innihald og samstarv. Forskúlin verður tví- sporaður, soleiðis at pláss verður fyri 48 næmingum. Mett verður skilabest, at næmingarnir verða í forskúla í fýra undirvísingartímar um dagin í skúlanum (20 tímar um vikuna), og at næmingarnir møta kl. 8.00. Tó eiga foreldur at hava møguleika at lata børnini frá sær í skúlanum kl. 7.30., hetta kann t.d. skipast við, at starvsfólkini í forskúlanum skiftast at møta tíðliga. Eftir skúlatíð eru tey í frítíðarskúlanum.

Gerandisdagurin í forskúlanum verður skipaður í samstarvi millum pedagogar og lærarar. Virksemið í forskúlanum skal stuðla fjølbroyttu menningini og støðugu læritilgongdini hjá einstaka barninum. Leikur og spæl eru ein týðandi partur í forskúlanum, og samspæl skal vera millum læring og leik. Í forskúlanum verður dentur lagdur á mál og málmenning, støddfrøði og náttúru, rørslu og motorik, sosialar førleikar, samveru og samstarv.

Tað er ikki lógarkrav, at børnini fara í skúla 6 ára gomul. Tó hava børn í Tórshavn havt møguleika at fara í forskúla síðani 1963. Kommunan hevur ikki gjørt neyva kanning um tørvin á nýggjum forskúlatilboði í kommununi, men landspolitiskt hevur leingi verið talað um at lækka undirvísingarskylduga aldurin niður í 6 ár. Eitt alternativ til hetta er forskúli, har fakliga samstarvið millum pedagogar og lærarar er ein eyðsýndur fyrimunur í mun til vanligan skúlaflokk. Hetta samstarv um forskúlanæmingarnar kann tí vera góð fyrimynd fyri líknandi fakligt samstarv um innskúlingina annars, tvs. 1.-3. flokk.
Leggjast kann aftrat, at býráðið samtykti í 2012 ein nýggjan skúlabygnað fyri alla kommununa, har tað í álitinum varð mælt til at skipa heildarskúla við fólkaskúla, forskúla og frítíðarskúla í øllum teimum skúlum, tað ber til í mun til høliskarmarnar.

Nú Skúlin á Argjahamri er tikin í nýtslu, er ein upplagdur møguleiki at víðka tilboðið til tveir skúlar, soleiðis at foreldur, sum ynskja, at børnini ganga í forskúla, hava møguleika at skriva tey inn í forskúla í Sankta Frans skúla ella í forskúla í Skúlan á Argjahamri.

Eitt nýtt forskúlatilboð í kommununi hevur ávirkan á dagstovnaøkið. Færri børn verða í sætta árgangi í barnagørðunum, og tá forskúlin er á Argjum, kann væntast, at tað í stóran mun eru stovnarnir á Argjum, sum missa ein part av árganginum, tó at forskúlatilboðið er ikki avmarkað til Argir. Stovnarnir

mugu tí tillaga virksemið til broyttu fortreytirnar. Í mun til dagstovnaøkið sum heild merkir tað, at kommunan betri kann nøkta plásstørvin alt árið.

<u>Fígging:</u>
Í 2013 eru útreiðslurnar fyri hvørt barn í barnagarði 48.613 kr. netto (tvs. uttan 25% foreldragjald). Útreiðslurnar fyri børn í frítíðarskúla til forskúla eru 28.659 kr. netto, og útreiðslurnar fyri børn í forskúla eru 29.663 kr. Eindargjaldið fyri børn í forskúla og tilhoyrandi frítíðarskúla er í alt 58.322 kr. netto.

Kostnaðurin fyri hvørt barn í forskúla og tilhoyrandi frítíðarskúla er sostatt 9.709 kr. netto hægri enn kostnaðurin fyri hvørt barn í barnagarði, og høvuðsorsøkin til hetta er, at til forskúlan er einki foreldragjald. Foreldragjald er tó til frítíðarskúlan.

Um fult tal av næmingum, tvs. 48, er samlaði netto játtanartørvurin fyri tíðarskeiðið august-desember 2013 umleið 200.000 kr. Fyri eitt heilt skúlaár er talan um eina meirútreiðslu uppá uml. 450.000 kr.

Mett verður, at stovningarútreiðslurnar til forskúlan og víðkaða frítíðarskúlan er 550.000 kr. Stovningarútreiðslurnar eru til innbúgv, tilfar og fyrireikingar, herundir setanir.

Til stovningarútreiðslur og rakstur fyri árið 2013 er samlaði fíggjartørvurin netto kr. 750.000. Mett verður, at upphæddin kann fíggjast á henda hátt:

| | | | |
|---|---|---|---|
| Konta 4201 | Endurgjald til lærlingaútreiðslur | 250.000 kr. | (Staðfest minninýtsla 2012) |
| Konta 5210 | Kvøldskúlin | 500.000 kr. | (Staðfest minninýtsla 2012) |

Forskúlin verður knýttur til rakstrarjáttanina hjá Skúlanum á Argjahamri, konta 4121, og tí verður talan um at flyta fígging pr. barn frá stovnsøkinum á grein 3 lutvíst til skúlan og lutvíst til rakstrarstaðið hjá frítíðarskúlanum, konta 3142. Hetta verður gjørt formliga, tá til ber at staðfesta, hvussu innskrivingin hevur verið.

<u>Tilgongd:</u>
Skal forskúlin byrja komandi skúlaár, so sum ætlanin er, eigur at verða miðað í móti, at innskrivingin av næmingum verður í vikuni fyri páskafrítíðina t.d. 20. og 21. mars. Undan innskrivingini verður kunnað um nýggja tilboðið, so foreldur í Tórshavnar kommunu vita, at tey hava møguleika at skriva barn teirra inn í forskúla í Skúlanum á Argjahamri.

Umráðandi er, at innskrivingin er so tíðliga sum til ber, soleiðis at starvsfólkini , ið sett verða, saman við skúlaleiðsluni fáa tíð at fyrireika tilboðið og hava ávirkan á, hvussu hann skal skipast, so tey kenna seg eiga part í tí, tey sjálv skulu fremja í verki.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at ganga skrivinum frá skúlastýrinum á møti og søkja Mentamálaráðið um loyvi at seta á stovn tvísporaðan forskúla í Skúlanum á Argjahamri frá skúlaárinum 2013/2014, og í hesum sambandi at víðka frítíðarskúlan á Argjahamri til eisini at fevna um forskúlanæmingarnar. Harumframt verður mælt til at fíggja metta meirkostnaðin í inniverandi ári kr. 200.000 og stovningarútreiðslur kr. 550.000 til forskúlan og frítíðarskúlan, í alt kr. 750.000, samsvarandi yvirlitinum omanfyri.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Málið varð umrøtt og verður tikið upp aftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 27. februar 2013:** Samtykt at arbeiða víðari við ætlanini um forskúla í skúlanum á Argjahamri at byrja skúlaárið 2014/2015 og forskúlatilboðum í kommununi sum heild.

**Ískoyti:**
Landsstýrismaðurin hevur hin 8. august 2013 lýst kunngerð um skipan og læring í forskúla. Skipanarliga og innihaldsliga grundarlagið undir forskúlum er sostatt formliga skipað.

Í stuttum verður ásett, at virksemið í forskúlanum skal vera sameindur partur av byrjanarundirvísingini og verða skipað við atliti at menningarstøði hjá einstaka barninum og við støði í teimum førleikum og arbeiðshættum, barnið hevur ment í heimi og dagstovni ella dagrøkt (§ 1). Virksemið skal tryggja børnunum eina læritilgongd, har eitt samspæl millum læring og leik fer fram (§ 2).

Landsstýrismaðurin kann eftir umsókn loyva kommunu at seta á stovn forskúlaflokk, sum kommunan ber útreiðslurnar av (§ 4). Forskúlaflokkur skal hava tilknýti til ein fólkaskúla og skal húsast undir somu lon sum kommunali skúlin. Skúlaleiðarin hevur dagligu ábyrgdina av forskúlanum við tilvísing til kommununa, tá talan er um fíggjar- og hølisviðurskifti. Skúlaleiðarin setir og loysir úr starvi starvsfólkini í forskúlanum í samráð við kommununa (§ 5). Skipað samstarv skal vera millum lærarar og pedagogar í forskúla, byrjanarundirvísing og frítíðarskúla. Í forskúla skulu starvast bæði lærari og pedagogur. Lærarar og pedagogar skulu í felag fyrireika og samskipa virksemið í forskúlanum, so tað verður samanhangur millum læring og leik (§ 6).

Við tilvísing til samtyktina hjá mentamálanevndini 27. februar 2013 hevur

Skúlin á Argjahamri í skrivi dagfest 15. apríl 2013 heitt á kommununa um at taka fyrireikingar til forskúla á skrá til komandi fíggjarár, soleiðis at ein ætlan kann leggjast fyri fyrireikingararbeiðið og peningur settur av til forskúla.

Sambært tørvskanningini á dagstovnaøkinum, sum Gallup Føroyar gjørdi fyri kommununa í mai 2013, svarar umleið helvtin av foreldrunum seg umhugsa at barn teirra skal í forskúla. Kanningin vísir eisini, at valið at lata barnið í forskúla er í ávísan mun treytað av, at tilboðið er í tí skúla, foreldrini ætla, at barnið skal ganga í vanligan skúla.

Í hesum sambandi vísir kanningin, at Sankta Frans skúli og Skúlin á Argjahamri hava nærum eins undirtøku um forskúla, og tað bendir á, at foreldur fara at velja forskúla, um forskúli verður í Skúlanum á Argjahamri. Skúlaárið 2013/2014 eru 45 børn í forskúlanum í Sankta Frans skúla, so væntast kann tí, at grundarlag er fyri tveimum forskúlaflokkum á Argjahamri.

Í mun til møguleikar fyri forskúlatilboðum í allari kommununi verður víst til tørvslýsingina *Skúlabygnaður og skúlabygningar – Tørvslýsing miðstaðarøkið*, har tað er lagt upp til at skipa karmar fyri forskúla og frítíðarskúla til forskúla í øllum skúlum.

Kommunan hevur áður fingið upplýst frá Mentamálaráðnum, at ongin heimild er í fólkaskúlalógini at krevja foreldur eftir forskúlagjaldi. Skal forskúlagjald kunna krevjast frá foreldrum, er neyðugt við positivari lógarheimild sum í § 6 í dagstovnalógini.

Sankta Frans skúli hevur í mong ár kravt foreldur eftir gjaldið til forskúlan kr. 200 um mánaðin sum eitt ískoyti til keyp av tilfari o.ø. Vísandi til manglandi lógarheimildina er í fíggjarætlanaruppskotinum 2014 fyri Sankta Frans skúla hetta gjald (inntøka) strikað.

Hin 20. september 2013 almannakunngjørdi Eysturkommuna nøgdsemiskanning um teirra forskúlatilboð Skúlaspírin. Har kemur fram, at kommunan krevur foreldragjald til forskúla kr. 950 um mánaðin. Sjónarmiðið hjá Eysturkommunu er, at tað í fólkalógini er ikki nakað forboð móti foreldragjaldi, og at forskúlin í mun til fólkaskúlan er kommunalur stovnur. Eisini verður víst til, at Sankta Frans skúli tekur foreldragjald.

Í mun til í Tórshavnar kommunu er forskúlin og tilhoyrandi frítíðarskúlin í Eysturkommunu einasta tilboðið til tey 6 ára gomlu, tvs. frælsið hjá foreldrum at velja forskúla ella dagstovn er ikki til staðar eins og í Tórshavnar kommunu. At samanbera foreldragjaldið í Eysturkommunu og tað hjá Sankta Frans skúla ber bert til í prinsippinum, tí upphæddirnar eru sera ymiskar og taka støði í heilt ymsum fortreytum.

At áseta foreldragjald við støði í veruliga kostnaðinum, eins og gjørt verður á dagstovnaøkinum, reisir aðrar spurningar, eitt nú um rættindi til fíggjarlig fríploss og systkinaavsláttur.

Í fíggjarligu lýsingini omanfyri (til fundirnar í februar) er lagt upp til forskúlatilboð uttan foreldragjald.

Rakstrarkostnaðurin bæði av forskúla og frítíðarskúla til forskúlan er við støði í 2013-eindarkostnaðum kr. 2.834.105 tilsamans fyri 48 børn eitt heilt skúlaár. Býtt sundur er rakstrarkostnaðurin av forskúlanum kr. 1.458.473, og av frítíðarskúlanum kr. 1.375.632 (harumframt kemur foreldragjald 25%). Tá kostnaðurin av 48 dagstovnaplássum kr. 2.333.424 verður drigin frá, er nettokostnaðurin av samlaða forskúlatilboðnum á Argjahamri fyri kommununa kr. 500.681 um árið.

Nettofíggjartørvur til rakstur seinnu hálvu av 2014 er sostatt kr. 200.341. Saman við stovningarútreiðslum og fyrireiking mett til kr. 555.000 verður samlaði fíggingartørvurin kr. 805.341. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2014 er ikki lagt upp fyri hesi játtan.

Rakstrarjáttanirnar til ávikavist forskúlan, frítíðarskúlan og dagstovnar verður regulerað samsvarandi barnatalinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at søkja Mentamálaráðið um loyvi til tvísporaðan forskúla í Skúlanum á Argjahamri frá skúlaárinum 2014/2015, og í hesum sambandi at víðka Frítíðarskúlan á Argjahamri til eisini at fevna um forskúlanæmingar. Mælt verður harumframt at fáa fígging til vega til endamálið.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Samtykt at søkja Mentamálaráðið um loyvi til at seta á stovn forskúla á Argjahamri, og at ásett verður foreldragjald til forskúla, sum saman við frítíðarskúlagjaldinum verður samanberiligt við eitt dagstovnagjald. Harumframt samtykti nevndin, at Skúlin á Argjahamri orðar námsætlan fyri forskúlatilboðið.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útsett til næsta fund.

**Ískoyti:**
Í telduskrivi dagfest 18. november 2013 upplýsir Mentamálaráðið kommununi, at í galdandi fólkaskúlalóg er eingin áseting um heimild at krevja foreldragjald fyri forskúla. Meginreglan við fólkaskúlaskipanini er, at undirvísingin í fólkaskúlanum er ókeypis, tí talan er um tvungna skipan.

Skipanin við forskúla í fólkaskúlanum er ikki ein tvungin skipan, men ein tænasta. Mentamálaráðið hevur ikki myndugleikaavgerð viðvíkjandi kommunalum gjøldum, men myndugleikin, sum varðar av kommunumálum.

Sagt verður víðari, at kommunan rindar virksemi í forskúlaflokki og ger sjálv av, um foreldragjald verður kravt.

Við støði í samtyktini hjá mentamálanevndini 9. oktober 2013 verður foreldragjaldið til forskúla, saman við foreldragjaldinum til frítíðarskúlan, ásett at vera sama upphædd sum dagstovnagjaldið. Hetta verður at galda um bæði forskúlan í Sankta Frans skúla og skúlanum á Argjahamri.

Fíggjartørvurin fyri 2014 er kr. 425.622, íroknað stovningarútreiðslur til nýggja forskúlatilboðið á Argjahamri og avleiddar sparingar á dagstovnaøkinum grein 3.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna hesa skipan og at játta kr. 425.622 til endamálið fyri fíggjarárið 2014.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Foreldragjaldið fyri forskúla og tilhoyrandi frítíðarskúla er samanlagt tað sama, sum foreldragjaldið fyri eitt barnagarðspláss. Skúlaárið 2014/2015 er fyrsta árið, at henda skipan við foreldragjaldi er galdandi, og praksis hetta árið hevur verið, at nøkur børn, sum fáa fíggjarlig fríplláss í frítíðarskúla til forskúla, eisini hava fingið fíggjarlig fríplláss í forskúla.

Tá forskúli varð settur á stovn í Skúlanum á Argjahamri, og núverandi foreldragjald varð ásett fyri báðar forskúlarnar í Tórshavnar kommunu, var ætlanin, at reglurnar á dagstovnaøkinum viðvíkjandi fíggjarligum frípllássi og systkinaavsláttri eisini skuldu vera galdandi fyri forskúlagjaldið. Fíggjardeildin hevur tó gjørt vart við, at hetta framgongur ikki greitt av málslýsingini og samtyktunum í málunum omanfyri, og tí er heimildin fyri at játta fíggjarlig fríplláss til forskúla ógreið.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sama skipan sum á dagstovnaøkinum viðvíkjandi fíggjarligum frípllássi og systkinaavsláttri verður galdandi fyri forskúlan at galda frá inniverandi skúlaárið.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndin.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 119/15 Innbúgv til Hoyvíkar skúla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 132/15 | 14/00434-8 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 165/15 | 14/00434-8 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 119/15 | 14/00434-8 |

**Málslýsing**:
Leiðslan í Hoyvíkar skúli og skúlastýrið hava gjørt vart við, at neyðugt er at umvæla og dagføra skúlan.

Leiðslan metir, at tað, sum hevur størstan týdning beint nú, er at dagføra felagsøkini hjá næmingum og arbeiðsrúmið hjá starvsfólkum. Talan er serliga um innbúgv, teldukervið og umstøður hjá næmingum og lærarum.

Tørvur er á nútíðarhóskandi innbúgvi til næmingarnar í Pyramiduhøllini og í felagshølunum hjá eldru næmingunum.

Kostnaðarmeting fyri innbúgv til felagshølini og Pyramiduhøllina er 250.000 kr.

Aftrat hesum er tørvur á innbúgvi til arbeiðsrúmi hjá starvsfólkum, og metti kostnaðurin fyri innbúgvið er 140.000 kr.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Hoyvíkar skúla 390.000 kr. til innbúgv til felagsøkini og til arbeiðsrúmið av L41008, E-lonin í Eysturskúlanum.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 120/15 Umsókn frá B36 um stuðul til umvælingar av ungdómshølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 148/15 | 15/01027-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 167/15 | 15/01027-3 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 120/15 | 15/01027-3 |

**Málslýsing**:
Í umsókn, dagfest 24. mars 2015, søkir Fótbóltsfelagið B36 um stuðul frá Tórshavnar kommunu til umvælingar og dagføringar av felagshúsinum, sum eru mettar at kosta kr. 696.000 kr. u/mvg. Umsókn er eisini send til Fótbóltssamband Føroya um stuðul úr Hattrick grunninum.

B36-húsið varð tikið í nýtslu á heysti í 1991.Bert neyðugt viðlíkahald er gjørt, tó onkrar dagføringar eisini,og er tað alt gjørt sum sjálvboðið felagsarbeiði. Sagt verður í skrivinum, at nú er neyðugt við nøkrum størri ábótum á felagshúsið, serliga við atliti at ungdómshølum felagsins.

Umvælingar skulu gerast í kjallarahæddini, har m.a. frárenning frá áskoðaraplássunum er atvoldin til, at tað lekur og kondensar og hevur havt við sær skaða á veggir, gólv og loft.

Arbeiðið, er mett at kosta kr. 696.000 u/mvg, og fevnir um:

- Umvæling og tetting av tribunu
- Umvæling/tetting av skansaklædningi (veggur móti vøllinum)
- Niðurtøka og burturbeining av veggjaklædningi og lofti
- Veggir og loft

Í teldubrævi 8. mai 2015 boðar B36 frá, at FSF stuðlar umvælingini við kr. 150.000.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 30% av kr. 696.000, tilsamans kr. 208.800,00 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 121/15 Yvirtøka av vegnum Mikkjalstrøð matr. nr. 887a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.06.2015 | 72/15 | 15/01771-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 173/15 | 15/01771-3 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 121/15 | 15/01771-3 |

**Málslýsing**:
Borgarar venda sær javnan til kommununa við áheitan um at gera ábøtur á privatar vegir og/ella við áheitan um, at kommunan yvirtekur hesar.

Fyrisiting kommununnar, hevur í seinastuni svara umsøkjarum, at býarverkfrøðingurin arbeiðir við at gera eina yvirskipaða reglugerð fyri yvirtøku og/ella ábøtur á privatar vegir, - ella um borgarin/umsøkjarin ikki er ánari av vegnum, so er víst til, at tað eru tinglýstu ánararnir, sum skulu søkja kommununa um yvirtøku.

Borgarar hava vent sær til kommununa við áheitan um at ábøtur verða gjørdar á vegin Mikkjalstrøð og at kommunan yvirtekur vegin (sí eisini j. nr. 15/00896-2).

Fyrisitingin hevur svara, at býráðið kann geva til kennar, at kommunan er sinnað, at yvirtaka vegin við fíggjarligum og tekniskum treytum, sum yvirtøkan skal lúka og at tað tá er upp til tinglýstu ánararnar, hvørt teir taka av.

Umsitingin hevur støðulýst vegin og kostnaðarmett møguligar ábøtur (sí j. nr. 15/01771-2).

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at nevndin gevur til kennar, hvørt kommunan er sinnað at yvirtaka vegin Mikkjalstrøð og hvørjar treytir skulu setast í sambandi við yvirtøku av vegnum.

**Tekniska nevnd 03. juni 2015:** Samtykt at yvirtaka vegin Mikkjalstrøð og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 122/15 Venjingarskúlin/Tórshavnar Kommunuskúli, útreiðslur í sambandi við samanlegging.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 73/15 | 15/01482-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.05.2015 | 115/15 | 15/01482-2 |
| 3 Býráðsfundir | 21.05.2015 | 97/15 | 15/01482-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 147/15 | 15/01482-2 |
| 5 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 122/15 | 15/01482-2 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 15/01482-2 |

**Málslýsing**:
Fyrsta januar 2015 vóru Venjingarskúlin og Tórshavnar Kommunuskúli lagdir saman í ein skúla, og umsitingin hevur síðani tá havt tveir fundir við skúlaleiðaran um gongdina og útreiðslur í sambandi við samanleggingina

Skúlaleiðslan í Venjingarskúlanum/Tórshavnar Kommunuskúla fær serkøna hjálp til ráðgeving og sparring, og Mentamálaráðið ber útreiðslurnar av tí.

Umframt útreiðslur til ráðgeving eru útreiðslur til tilfar, tøkni og útgerð til samanlagda skúlan.

Venjingarskúlin og Tórshavnar Kommunuskúli vóru, nú teir vórðu lagdir saman, ikki líka væl útgjørdir við KT. Tað er umráðandi, at allur samanlagdi skúlin hevur eins umstøður, og tað ber ikki til at minka um atgongdina til t.d. teldlar hjá næmingum, ið framman-undan hava teldlar, sum verða brúktir í undirvísing. Tí verður mett neyðugt at keypa og uppstiga KT-útgerð, so allir næmingarnir og lærararnir hava somu atgongd til KT.

Sambært skúlanum eru mettu útreiðslurnar til tilfar, tøkni og útgerð 1.900.000 kr., harav 1.200.000 kr. til teldlar til næmingar í 2. -9. fl.

Á nøkrum kontum til skúlaøkið er minninýtsla í 2014, og til ber at nýta hetta til part av tørvinum soleiðis:

| | |
|---|---:|
| 4123 Frískúlin við Hoyvíkstjørn | 60.000 |
| 4124 Frískúlin í Havn | 234.500 |
| 4140 Ætlanir á skúlaøkinum | 225.500 |
| 4144 Skúlabarnaflutningur | 50.000 |
| 4201 Endurgjald til lærlingaútreiðslur | 250.000 |
| **Tilsamans** | **820.000** |

Í rakstraræltan 2016 hjá Venjingarskúlanum/Tórshavnar Kommunuskúla eiga útreiðslur av samanleggingini at verða tiknar við í játtanina hjá skúlanum.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Venjingarskúlanum/Tórshavnar Kommunuskúla 820.000 kr. fyrst og fremst til næmingateldlar av hesum kontum 4123

FRískúlin við Hoyvíkstjørn, 4124 Frískúlin í Havn, 4140 Ætlanir á skúlaøkinum, 4144 Skúlabarnaflutningur og 4201 Endurgjald til lærlingaúteiðslur.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Útsett við atliti til nærri lýsing av málinum.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Útsett.

**Ískoyti:**
Frágreiðing verður á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið við tí ískoyti, at skipanin verður koyrd sum ein royndarverkætlan við greiðum mannagongdum og leiðreglum, og at verkætlanin verður ávegis eftirmett hvørt hálva ár í einum tíðarskeiði á tvey ár.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

# 123/15 Bjarti Thomsen: Umsókn um byggiøki til hotel í Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Nólsoyarnevndin | 25.02.2014 | 4/14 | 14/00390-21 |
| 10 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 148/15 | 14/00390-21 |
| 11 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 123/15 | 14/00390-21 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 16.06.2014 | 13/14 | 14/00390-21 |
| 3 Nólsoyarnevndin | 28.10.2014 | 16/14 | 14/00390-21 |
| 4 Nólsoyarnevndin | 18.11.2014 | 18/14 | 14/00390-21 |
| 5 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 314/14 | 14/00390-21 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 102/15 | 14/00390-21 |
| 7 Nólsoyarnevndin | 20.05.2015 | 2/15 | 14/00390-21 |
| 8 Fíggjarnevnd | 18.05.2015 | 128/15 | 14/00390-21 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 131/15 | 14/00390-21 |

**Nólsoyarnevndin 16. juni 2014:** Útsett. **Nólsoyarnevndin 28. oktober 2014:** Arbeitt verður við málinum at leggja fyri aftur á komandi fundi.

**Nólsoyarnevndin 18. november 2014:** Nólsoyarnevndin mælir fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting.

**Fíggjarnevnd 03. desember 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur roynt at finna aðra staðseting til bygging av hotelli í Nólsoy. Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy er einki B vinnuøki, sum er egnað til endamálið.

Umsøkjarin hevur víst á øki syðst á matr. nr. 129a (øki 1). Sambært byggisamtyktini er hetta E-øki, Alment frítíðarøki og TK stendur sum eigari av økinum. So hetta krevur eina broyting av byggisamtyktini.

Býarskipanardeildin hevur funnið eitt annað øki, sum hevur eina rímiliga atgongd og er ogn hjá TK. Hetta er oman fyri bygdina, beint eystan fyri barnagarðin (øki 2). Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy liggur hetta økið í umráðispartinum A-sethús. Henda loysnin krevur tí eisini eina broyting í byggisamtyktini.

Málið var viðgjørt av teknisku nevnd 9. desember 2013, har samtykt var at broyta byggisamtyktina fyri (øki 1). Síðani var málið sent til hoyringar hjá Nólsoyarnevndini, sum 18. november 2014 mælti fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting. Í samtyktini er ikki víst til nakra ítøkiliga grundgeving.

Vinnu- og økissamskiparin Gunnar Djurhuus hevur síðani haft fund við umsøkjaran, sum vísti á at (øki 1) var tað einasta hóskandi øki til hansara ætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og umsitingin fyrireikar mál til broyting av byggisamtyktini til næsta fund í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at beina málið aftur í býggi- og býarskipanarnevndina.

**Nólsoyarnevndin 20. maj 2015:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at ganga umsóknini hjá Bjarta Thomsen á møti, soleiðis at kommunan fær matr. nr. 129b í býti fyri part av matr. nr. 129a, Nólsoy, sum byggisamtyktin nú verður broytt til B øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy.
**Nólsoyarnevndin 16. juni 2014:** Útsett. **Nólsoyarnevndin 28. oktober 2014:** Arbeitt verður við málinum at leggja fyri aftur á komandi fundi.

**Nólsoyarnevndin 18. november 2014:** Nólsoyarnevndin mælir fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting.

**Fíggjarnevnd 03. desember 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur roynt at finna aðra staðseting til bygging av hotelli í Nólsoy. Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy er einki B vinnuøki, sum er egnað til endamálið.

Umsøkjarin hevur víst á øki syðst á matr. nr. 129a (øki 1). Sambært byggisamtyktini er hetta E-øki, Alment frítíðarøki og TK stendur sum eigari av økinum. So hetta krevur eina broyting av byggisamtyktini.

Býarskipanardeildin hevur funnið eitt annað øki, sum hevur eina rímiliga atgongd og er ogn hjá TK. Hetta er oman fyri bygdina, beint eystan fyri barnagarðin (øki 2). Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy liggur hetta økið í umráðispartinum A-sethús. Henda loysnin krevur tí eisini eina broyting í byggisamtyktini.

Málið var viðgjørt av teknisku nevnd 9. desember 2013, har samtykt var at broyta byggisamtyktina fyri (øki 1). Síðani var málið sent til hoyringar hjá Nólsoyarnevndini, sum 18. november 2014 mælti fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting. Í samtyktini er ikki víst til nakra ítøkiliga grundgeving.

Vinnu- og økissamskiparin Gunnar Djurhuus hevur síðani haft fund við umsøkjaran, sum vísti á at (øki 1) var tað einasta hóskandi øki til hansara ætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og umsitingin fyrireikar mál til broyting av byggisamtyktini til næsta fund í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at beina málið aftur í býggi- og býarskipanarnevndina.

**Nólsoyarnevndin 20. maj 2015:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at ganga umsóknini hjá Bjarta Thomsen á møti, soleiðis at kommunan fær matr. nr. 129b í býti fyri part

av matr. nr. 129a, Nólsoy, sum byggisamtyktin nú verður broytt til B øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Nólsoyarnevndin 16. juni 2014:** Útsett
.
**Nólsoyarnevndin 28. oktober 2014:** Arbeitt verður við málinum at leggja fyri aftur á komandi fundi.

**Nólsoyarnevndin 18. november 2014:** Nólsoyarnevndin mælir fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting.

**Fíggjarnevnd 03. desember 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur roynt at finna aðra staðseting til bygging av hotelli í Nólsoy. Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy er einki B vinnuøki, sum er egnað til endamálið.

Umsøkjarin hevur víst á øki syðst á matr. nr. 129a (øki 1). Sambært byggisamtyktini er hetta E-øki, Alment frítíðarøki og TK stendur sum eigari av økinum. So hetta krevur eina broyting av byggisamtyktini.

Býarskipanardeildin hevur funnið eitt annað øki, sum hevur eina rímiliga atgongd og er ogn hjá TK. Hetta er oman fyri bygdina, beint eystan fyri barnagarðin (øki 2). Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy liggur hetta økið í umráðispartinum A-sethús. Henda loysnin krevur tí eisini eina broyting í byggisamtyktini.

Málið var viðgjørt av teknisku nevnd 9. desember 2013, har samtykt var at broyta byggisamtyktina fyri (øki 1). Síðani var málið sent til hoyringar hjá Nólsoyarnevndini, sum 18. november 2014 mælti fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting. Í samtyktini er ikki víst til nakra ítøkiliga grundgeving.

Vinnu- og økissamskiparin Gunnar Djurhuus hevur síðani haft fund við umsøkjaran, sum vísti á at (øki 1) var tað einasta hóskandi øki til hansara ætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og umsitingin fyrireikar mál til broyting av byggisamtyktini til næsta fund í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at beina málið aftur í býggi- og býarskipanarnevndina.

**Nólsoyarnevndin 20. maj 2015:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at ganga umsóknini hjá Bjarta Thomsen á møti, soleiðis at kommunan fær matr. nr. 129b í býti fyri part

av matr. nr. 129a, Nólsoy, sum byggisamtyktin nú verður broytt til B øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy.
**Nólsoyarnevndin 16. juni 2014:** Útsett
.
**Nólsoyarnevndin 28. oktober 2014:** Arbeitt verður við málinum at leggja fyri aftur á komandi fundi.

**Nólsoyarnevndin 18. november 2014:** Nólsoyarnevndin mælir fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting.

**Fíggjarnevnd 03. desember 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur roynt at finna aðra staðseting til bygging av hotelli í Nólsoy. Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy er einki B vinnuøki, sum er egnað til endamálið.

Umsøkjarin hevur víst á øki syðst á matr. nr. 129a (øki 1). Sambært byggisamtyktini er hetta E-øki, Alment frítíðarøki og TK stendur sum eigari av økinum. So hetta krevur eina broyting av byggisamtyktini.

Býarskipanardeildin hevur funnið eitt annað øki, sum hevur eina rímiliga atgongd og er ogn hjá TK. Hetta er oman fyri bygdina, beint eystan fyri barnagarðin (øki 2). Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy liggur hetta økið í umráðispartinum A-sethús. Henda loysnin krevur tí eisini eina broyting í byggisamtyktini.

Málið var viðgjørt av teknisku nevnd 9. desember 2013, har samtykt var at broyta byggisamtyktina fyri (øki 1). Síðani var málið sent til hoyringar hjá Nólsoyarnevndini, sum 18. november 2014 mælti fíggjarnevndini til at vísa á aðra staðseting. Í samtyktini er ikki víst til nakra ítøkiliga grundgeving.

Vinnu- og økissamskiparin Gunnar Djurhuus hevur síðani haft fund við umsøkjaran, sum vísti á at (øki 1) var tað einasta hóskandi øki til hansara ætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti og umsitingin fyrireikar mál til broyting av byggisamtyktini til næsta fund í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at beina málið aftur í býggi- og býarskipanarnevndina.

**Nólsoyarnevndin 20. maj 2015:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at ganga umsóknini hjá Bjarta Thomsen á møti, soleiðis at kommunan fær matr. nr. 129b í býti fyri part av matr. nr. 129a, Nólsoy, sum byggisamtyktin nú verður broytt til B øki í byggisamtyktini fyri Nólsoy.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 124/15 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundir | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m2 til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.
Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

Onnur formlig viðurskifti:
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Endalig avkláring uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur, sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 $m^2$ i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

# 125/15 Áheitan um at fáa avgreitt ógreiðu matrikulviðurskifti á matr. nr. 658, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.11.2014 | 259/14 | 14/03110-12 |
| 2 Fíggjarnevnd | 12.11.2014 | 303/14 | 14/03110-12 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 84/14 | 14/03110-12 |
| 4 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 313/14 | 14/03110-12 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 104/15 | 14/03110-12 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 138/15 | 14/03110-12 |
| 7 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 174/15 | 14/03110-12 |
| 8 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 125/15 | 14/03110-12 |

**Málslýsing:**
Mortan í Hamrabyrgi hevur vegna eigaran av matr. nr. 658d, Tórshavn, (Guttorm Sune Andreasen) heitt á kommununa um at fáa tikið neyðugt stig til at rudda upp í matrikuleru viðurskiftinum kring ognina. Millum annað verður víst á, at partar av hansara matrikli eru á ringvegnum.

Guttorm Sune Andreasen hevur ynski um at fáa ognað sær uml. 161 fermetrar av matr. nr. 692a, Tórshavn, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu. Henda ogn er millum annað partur av øllum økinum, har Eysturskúlin er staðsettur. Økið er formað sum eitt sokallað 'kotelett stykki' við einum uml. 23 m breiðum geira oman móti ringvegnum Yviri við Strond.

Tekniska nevnd skal taka støðu til, um ynski hjá Guttorm Sune Andreasen kemur at føra við sær skerdar atkomumøguleikar fyri økið framman fyri eysturskúlan um hetta einaferð seinni skal byggjast út sum útstykking ella annað líknandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverfrøðingurin mæla til at ganga umbønini á møti, vísandi til at hetta ikki fer at føra við sær skerdar atkomumøguleikar til økið omanfyri. Mælt verður eisini til at beina málið í fíggjarnevndina viðv. støðutakan um hóskandi kostnað fyri nevnda økið, vísandi til hansrara pástand um kommunala ognartøku av uttanumøki á hansara ogn seinast í 1970 uttan endurgjald.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Samtykt at ganga umbønini á møti vísandi til at hetta ikki fer at føra við sær skerdar atkomumøguleikar fyri útbygging á økinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til ummælis. At leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at mæla fíggjarnevndini frá at selja part av økinum, vísandi til at hetta kann koma at forða fyri framtíðar útstykkingarmøguleikum í nærumhvørvinum.

**Fíggjarnevnd 03. desember 2014:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at ganga umbønini á møti vísandi til at hetta ikki fer at føra við sær skerdar atkomumøguleikar fyri útbygging á økinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 126/15 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri B6 vinnuøkið Yviri við Strond

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 129/15 | 15/01720-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 126/15 | 15/01720-1 |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

# 127/15 Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 130/15 | 15/01721-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 127/15 | 15/01721-1 |

**Málslýsing**:
Bjarti Thomsen hevur ætlanir um at fara undir hotel-virksemi í Nólsoy, og søkti í tí sambandi um at byggisamtyktin fyri Nólsoy varð broytt, soleiðis at ognin hansara matr. nr. 129b kundi brúkast til vinnuendamál.

Kommunan samtykti uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Nólsoy, men hendan umsókn varð ikki góðkend av Innlendismálaráðnum. (Sí j.nr. 2006-1981)

Síðani hevur ein long tilgongd verið ímóti at finna eina aðra loysn, so at ætlanin kann gerast veruleiki. Umsøkjarin ynskir, at ogn hansara matr. nr. 129b verður býtt um við eitt samsvarandi øki av matr. nr. 129a sum eitt gerðabýti. Sambært byggisamtyktini fyri Nólsoy liggur hetta økið sum E-øki sum alment frítíðarøki.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 8. mai 2015 at ganga ynski hansara á møti, treytað av at byggisamtyktin fyri hetta økið verður broytt til B-vinnuøki. (j. nr. 14/00390)

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Nólsoy verður broytt soleiðis, at uml. 2.100 $m^2$ av matr. nr. 129a, Nólsoy, verður broytt frá E-alment frítíðarøki til B-vinnuøki sambært kortskjali, dagf. 19. mai. 2015.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 128/15 Leigumál - FR.Petersensgøta 9.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 158/15 | 15/01834-2 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 128/15 | 15/01834-2 |

**Málslýsing**:
Ognin Fríðrik Petersens gøta 9, hevur uttan úrslit verið á sølulista í eitt áramál.

Fróðskaparsetur Føroya hevur nú vent sær til kommununa, um at kunna leiga bygningin í 3–5 ár at nýta til skrivstovu.

Útroknað nettovídd á ognini er 375m². Leiga 800 kr/m²/ár svarandi til árliga leiguinntøku á kr. 300.000,-.

Leigarin rindar harumfram fyri el og olju – meðan útleigarin rindar trygging og uttanveggja viðlíkahald.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga ognina út til Fróðskaparsetur Føroya í 5 ár.

Sí sáttmála j. nr. 15/01834 – 4.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 129/15 Útbygging av Hoyvíkshøllini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 6/14 | 14/00601-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 228/14 | 14/00601-10 |
| 11 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 4/15 | 14/00601-10 |
| 12 Býráðsfundir | 29.01.2015 | 8/15 | 14/00601-10 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 159/15 | 14/00601-10 |
| 14 Fíggjarnevnd | 22.06.2015 | 181/15 | 14/00601-10 |
| 15 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 129/15 | 14/00601-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 66/14 | 14/00601-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 79/14 | 14/00601-10 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.06.2014 | 199/14 | 14/00601-10 |
| 5 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 6 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 154/14 | 14/00601-10 |
| 7 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 165/14 | 14/00601-10 |
| 8 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 184/14 | 14/00601-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 196/14 | 14/00601-10 |

**Málslýsing:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 $m^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520$m^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Samtykt at heita á umsitingina um at fáa málið frá hondini.

**Mentamálanevndin 12. januar 2011:** Tekniski stjórin kunnaði um málið.

**Ískoyti:**

MAP Arkitektar hava gjørt skitsur av innrætting í mars 2010, og upprit v. kostnaðarmeting 17. februar 2010, áljóðandi kr. 4.587.245. Kostnaðarmeting har prosjektumsiting, ókent, prístalsregulering v.m. er lagt afturat meting ráðgevans, er av umsitingini mett til kr. 5.100.000. Tøkur peningur á játtanini er pr. 9. februar 2011 kr. 4.541.409. Írestandi kapitaltørvurin er á fyriliggjandi grundarlagi sostatt mettur til kr. 558.591.

Verkætlanin fevnir bert um liðugtgerð innan av pørtum av útbyggingini, sambært uppritinum hjá ráðgevanum.

Býráðið hevur 26. november 2009 samtykt at játta kr. 4,5 mió til verkætlanina, og 20. mai 2010 er samtykt at lata arbeiðið bjóða út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at:

- at góðkenna skitsuuppskotið hjá ráðgevanum
- at góðkenna uppskotið til sáttmála við ráðgevan
- at útvega metta írestandi kapitaltørvin á kr. 558.591 av íløgukontu 5775 L00001, løgujáttan,

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Jákup Eghom Hansen, tekniskur stjóri, greiddi frá. Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og mæla býráðnum til at játta kr. 559.000 av framfluttum íløgukarmi fyri 2010.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Málið umrøtt.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Málið umrøtt.

**Ískoyti:**
Tann 27. juni 2011 var lisitatión uppá útbygging av Hoyvíkshøllini. 4 tilboð komu inn. Úrslitið frá lisitatiónini tann var:

1. J & K Petersen kr. 4.733.029,33 u/ mvg
2. ÁTS kr. 5.182.139,75 u/ mvg
3. Búsetur kr. 6.010.299,24 u/ mvg
4. Articon kr. 6.291.903,00 u/ mvg

Metingin í byggiskránni nov. 2009 er kr. 4.224.000,- u/ mvg.

Lisitatiónsúrslitið kann tulkast sum ein staðfesting av, at áður gjørda kostnaðarmetingin, sum hevur ligið til grund fyri politisku viðgerðini, hevur verið so tíðliga í verkætlanini og á einum so mikið leysum grundarlag, at neyvleikin á henni er at rokna sum vegleiðandi.

Ráðgevin hevur kannað, um møguligt er at spara í tilboðsupphæddini og metir, at tað ikki er ráðiligt, tí hetta kemur at ganga út yvir umklæðingarrúmini, sum ikki verða tøk, um sparing

verður gjørd. Tær sparingar, sum kundu komið uppá tal, eru longu gjørdar í byggiskránni og í projekteringini.

Kannað er eisini, hvar munurin millum byggiskrá og tilboð stavar frá. Í byggiskránni er ikki roknað við, at bygningurin kemur so langt niður á parkeringsøkið, sum tær neyvu uppmátingarnar í projektinum hava staðfest.

Tað er serliga hetta, sum ger seg galdandi, har "grundin" verður hægri, sum er frávikið millum tilboð og byggiskrá.

Umsitingin hevur tí eisini kannað møguleikan fyri at gagnnýta hæddarmunin á økinum til kjallara, so at hølir, sum stórur tørvur er á í hesi høllini, kunna gerast undir útbyggingini, ístaðin fyri at fylla upp.

Tilboð uppá hetta arbeiðið er heintað inn frá lægstbjóðandi uppá upprunaútbjóðingina.

Við støði í frágreiðing frá MAP Arkitektar, sum er ráðgevi á verkætlanini um útbygging av Hoyvíkshøllini, hevur tekniska fyrisitingin gjørt kostnaðarmeting av, hvat verkætlanin, íroknað allar útreiðslur, kann væntast at koma at kosta. Íroknað hesa kostnaðarmeting er eisini umlegging av fjarhitarørum sum koma at liggja undir byggingini, og sum Fjarhitafelagið krevur flutt.

Fíggjarlig viðurskifti:
Býráðið hevur áður játtað kr. 5.100.000,- tilsamans til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini mæla til at taka av tilboðnum hjá J & K Petersen um upprunaliga tilboðið á kr. 4.733.029,33 u/ mvg og av ískoytistilboðnum á kr. 263.040,- at byggja fulla óinnrættaða veghædd undir umklæðingarrúmunum, og gera sáttmála við J & K Petersen um tilsamans kr. 4.996.069,33.

**Mentamálanevndin 8. september 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at taka av tilboðnum uppá kr. 4.996.069,33 frá J & K Petersen.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 29. september 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggimálið er komið fram, at neyðugt er at grava munandi longri niður fyri at koma niður á fast. Staðfest er, at neyðugt verður at grava eitt lag av mógvi burtur undan tilbygninginum, umleið 2,5 m., og fylla grótfyllu í aftur. Sambært upplýsingum frá Mikael Viderø, býararkitekti, verður kostnaðurin av hesum arbeiði umleið kr. 375.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta írestandi peningin kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 11. januar 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 375.000,00 av íløgum 2012, konto 5775 vøllurin í Hoyvík.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru kr. 2 mió settar av til framhald at gera útbygningin lidnan innan. Harumframt eru umleið kr. 300.000 tøkar á verkætlanarkontuni 5775 L57006 útbygging av Hoyvíkshøllini.

Enn standa partar av miðhæddini, øll veghæddin og øll loftshæddin óinnrættað. Mett verður, at fyri hesa játtan ber til at gera eitt umklæðingarrúm aftrat og almenn wc í miðhæddini eins og møguliga partar av veghæddini (kjallarin), har ætlan er at gera vektrúm (venjingarhøli) og fundar-/felagshøli.

Í hesum sambandi skal útbjóðingartilfar fáast til vega fyri liðugtgerð av miðhæddini og veghæddini. Arbeiðið verður at bjóða út í innbodnari lisitiatión.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini fyri 2014 til liðugtgerð av mið- og veghæddini, herundir at útvega útbjóðingartilfar og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at biðja umsitingina um at lýsa ætlanina fyri at gera forbygningin endaliga lidnan til næsta nevndarfund.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan er gjørd ein fyribils kostnaðarmeting fyri liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir. Umbidnu kostnaðirnir eru hesir:

- liðugtgerð av bygninginum sum er bygdur, tvs. allar hæddir,
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt umklæðingarrúm afturat
    - kostnaðurin av miðhæddini við at gera eitt goymslurúm í staðin fyri umklæðingarrúm

Kostnaðarmetingar verða lagdar fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at fara á ástaðarfund á næsta nevndarfundi.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Nevndin hevur verið á ástaðarfundi.

Samtykt at biðja umsitingina um tilmæli við atliti at heildarætlanini og funktionalitet, tørvinum hjá felagnum og tøku játtanini.

**Ískoyti**
Í skrivi dagfest 5. juni 2014 metir nevndin í H71, at í løtuni er tað ikki fleiri skiftingarrúmum, sum størstur tørvur er á. Heldur hevur tað skund at fáa felagshølið á ovastu hædd gjørt klárt, eins og stórur tørvur er á at fáa venjingarhølið klárt.

Í tørvslýsingini frá 2009 er ikki lagt upp til, at H71 skal hava felagshøli í útbygninginum. Tað varð heldur ikki lagt upp til venjingarhøli í tørvslýsingini. Tað er tó møguligt at leggja bæði felagshøli og venjingarhøli í útbygningin, tí at veghæddin kom aftrat í mun til upprunaligu verkætlanina við tveimum rættiliga stórum hølum (uml. 150 m2 í alt).

Metast má, at ovasta hæddin eigur at verða til meira almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a., so sum tørvslýsingin eisini legði meira upp til.

Í mun til sjálva høllina er tørvur á goymslu og fleiri almennum wc. Til ber at gera goymslu í tí hølinum, sum upprunaliga varð ætlað til umklæðingarrúm. Til ber at gera umklæðingarrúm har seinni.

Mett verður skilabest, at tøka upphæddin kr. 2 mió verður brúkt soleiðis við støði í omanfyri nevndu funktiónslýsing: almenn wc og goymslu í miðhæddini, felagshøli og venjingarhøli í veghæddini. Gerast skal neyvari kostnaðarmeting, um játtanin røkkur til hesi endamál, og um ikki, hvat skal takast burturúr.

Ovasta hæddin við hartil hoyrandi atkomuviðurskiftum (lift) verður at bíða til seinni.

Felagið rindar sjálvt útgerð, innbúgv v.m. til felagshølið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2 mió av íløguætlanini konta 5775 Høllin í Hoyvík til at gera almenn wc og goymslu í miðhæddini, harumframt at gera felagshøli og venjingarhøli í veghæddini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt og útsett.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Við støði í umrøðuni á mentamálanevndarfundinum 24. juni 2014 kann staðfestast ávíst ynski um, at ovasta hæddin verður gjørd fyrst, og at arbeiði verður boðið út sum undirhondsboð, so at ein ítøkiligur kostnaður kann staðfestast.

Mælt verður til at halda fast í omanfyri nevndu funktiónslýsing, har ovasta hæddin eigur at verða til almenna nýtslu eitt nú kafé í sambandi við kappingar, tiltøk, almennar fundir o.a. Í sambandi við útboð eigur lyft at verða tikið við til tess at lúka krøv um atkomuviðurskifti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um útbjóðing.

**Mentamálanevndin 03. september 2014:** Nevndin samtykti at bjóða arbeiðið at innrætta ovastu hædd út sambært funktiónslýsingini og krøvum til atkomuviðurskifti sum undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.´

**Ískoyti:**

Fyri at bjóða arbeiðið út í undirhondsboð, er neyðugt at gera útbjóðingartilfar, t.e. tekningar, sum vísa innrætting, og frágreiðing um tilfar. Umsitingin hevur í hesum sambandi tosað við MAP arkitektar, sum hava teknað uppíbyggingina, um at fáa til vega hetta tilfar.

Tilfar verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at bjóða arbeiðið út soleiðis, at talan er um eitt stórt rúm við neyðugum atkomuviðurskiftum, brunaveggi og fyrireikingum til leiðingar til køk, wc og annað el.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Arbeiðið bleiv boðið út til 2 arbeiðstakarar, soleiðis sum nevndin hevur samtykt.

Inn komu 2 tilboð, hesi eru:
- Bjarni Poulsen kr. 2.106.270 uttan mvg, j.nr. 14/04771-4
- Eysturlon kr. 2.860.528 uttan mvg, j.nr. 14/04771-5

Av tí at onki veruligt útbjóðingartilfar er, so er tað torført at meta um innkomnu tilboðini, herundir hvørjar veitingar eru við, hvat slag av tilfari verður nýtt, hvussu trappur, vindeygu, ljósarmatur o.a. verður.

Kostnaðarmering, út frá tilboðnum frá Bjarna Poulsen:

| | |
|---|---|
| Tilboð uttan mvg | kr. 2.106.270 |
| Lift typa 2, alt íroknað | kr. 250.000 (kostnaður íalt kr. 500.000) |
| Óvæntað 25% | kr. 526.570 |
| Handverkaraútreiðslur íalt | kr. 2.882.840 |
| MVG, 6,75% | kr. 194.590 |
| Eftirlit og byggileiðsla | kr. 200.000 |
| **Kostnaðarmeting íalt** | **kr. 3.277.430** |

Viðmerkjast skal, at tað verður neyðugt at fáa skikkað fólk til at hava eftirlit við el- og vhs-arbeiðinum.

Útbjóðingartilfarið hevur j.nr. 14/04771-1

Um samtykt verður at arbeiða víðari við málinum, er neyðugt at fara undir sáttmálasamráðingar. Tøk upphædd á íløgukontuni er kr. 2 mió, tí verður neyðugt við meirjáttan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til støðutakan um, hvørt arbeiðast skal víðari við tilboðnum.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, taka ikki av innkomnum tilboðum, av tí at játtanin ikki røkkur.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at bjóða út liðugtger av bygninginum av nýggjum sum skjótast og útvega neyðugan pening til kostnaðin.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at beina málið í mentamálanevndina.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**
Í sambandi við, at býráðið hevur játtað 1 mió. kr. afturat til innrætting ( jnr. 15/01016, Meirinntøkur fyri 2014) verður málið tikið upp aftur.

Bjarni Poulsen hevur boðað frá, at tilboðið stendur við, og tað skal ikki roknast við príshækkingum.
Tekniska fyrisitingin hevur saman við H71 og hallarumsitingini hugt eftir ætlanini aftur, kostnaðarmetingin er eftirkannað. Upphæddin, ið avsett er til lift, er ov lítil.

Samlaða kostnaðarmetingin er kr. 3.600.000, har kostnaður til lift er íroknaður. Tøka játtanin á projektkontuni er kr. 1.015.000, harumframt eru kr. 2 mió settar av á íløgukarminum fyri 2014. Neyðugt er við meirfígging kr. 585.000, ið játtast kann av tøkum íløgukarmi 5775, ítróttaranlegg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum hjá Bjarna Poulsen, og at samlaða restupphæddin, kr. 2.585.000, verður játtað av framfluttum karmi á 5775, Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 130/15 Kvøldskúlin - hølisviðurskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 56/14 | 14/01802-1 |
| 10 Fíggjarnevnd | 11.03.2015 | 53/15 | 14/01802-1 |
| 11 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 42/15 | 14/01802-1 |
| 12 Býráðsfundir | 23.04.2015 | 69/15 | 14/01802-1 |
| 13 Býráðsfundir | 21.05.2015 | 103/15 | 14/01802-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 20.05.2015 | 128/15 | 14/01802-1 |
| 15 Fíggjarnevnd | 21.05.2015 | 134/15 | 14/01802-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 162/15 | 14/01802-1 |
| 17 Fíggjarnevnd | 22.06.2015 | 182/15 | 14/01802-1 |
| 18 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 130/15 | 14/01802-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 70/14 | 14/01802-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 119/14 | 14/01802-1 |
| 4 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 109/14 | 14/01802-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 182/14 | 14/01802-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 213/14 | 14/01802-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 216/14 | 14/01802-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 227/14 | 14/01802-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 54/15 | 14/01802-1 |

**Málslýsing:**

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

Sigrun Mohr varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**

Býráðið keypti í mai 2013 ovaru sjónvarpsbygningarnar í Vørðsluni, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a. Ætlan við hesum var at savna størri part av Kvøldskúlavirkseminum har. Í sambandi við keypið varð greitt, at bygningarnir tørvaðu ábøtur.

Kvøldskúlin hevur ynski um at taka partar av bygningunum í nýtslu sum skjótast, og hevur skotið upp, at framflyting av rakstri hjá kvøldskúlanum kr. 1,5 mió verður brúkt til at gera klár høli til tónleik og veving. Hetta vísir seg tó ikki at vera so lætt at fremja.

Arkitektavirki hevur gjørt skitsuppskot til innrætting av bygningunum til kvøldskúla eins og kostnaðarmeting fyri umvælingum v.m. frá oktober 2013, samlað mett til uml. kr. 8,5 mió við øllum. Tekniska fyrisiting tekur stór fyrivarni við hesi kostnaðarmeting m.a. vísandi til, at talan er um renoveringsprojekt, og kostnaðarmetingin tí er uml. 13 mió umframt mvg, ókent og ráðgeving. Til at koma víðari verður mett neyðugt við neyvari prosjekteringsgrundarlagi og heildarætlan viðvíkjandi bygningunum.

Annað ivamál eru útreiðslur í sambandi við brúnna yvir um M.A. Winthersgøtu. Ynski hjá Starvsmannafelagnum er at taka hana niður í summar, men bygningurin hjá Starvsmannafelagnum veitir ognini hjá Tórshavnar kommunu streym. Hetta er ikki vanlig mannagongd, og støða skal tí eisini takast til nýggja streymleiðing.

Harumframt er í frágreiðing staðfestur soppur í bygninginum. Tilráðing frá teknisku fyrisiting er ikki at taka bygningin í brúk til kvøldskúla, fyrr enn soppatrupulleikin er loystur.

Tá so er, er at meta nyttuleyst at brúka 1,5 mió uppá innrættingar júst nú. Heldur eigur arbeiði at vera sett í gongd at útgreina, hvat loysir seg best at gera, hvat skal gerast av funktiónsmessigum ávum, og hvat kostnaðurin verður.

Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið fer at kosta uml. kr. 150.000. Eingin játtan er sett av á íløguætlanini til kvøldskúlan. Mett verður ikki rætt, at kvøldskúlin av rakstri rindar fyri projektfyrireikingar, og tí eigur játtan at verða fingin til vega um íløguætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og tekniski stjóri mæla til at játta kr. 150.000 til:

- At gjørd verður byggitøknilig støðulýsing at fáa greiðu á, hvørjir bygningslutir mugu høvuðsumvælast ella skiftast
- At gjørd verður kravspesifikatión viðvíkjandi nýtslu, hølum o.l. í samstarvi við kvøldskúlan, umframt byggitøknilga kravspesifikatión og myndugleikakrøv
- At gjørd verður umvælingarætlan í stigum, innihaldandi tíðarætlan og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri fígging at seta í verk byggiætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at selja bygningarnar.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, mælir til, at gjørd verður heildarætlan fyri bygningarnar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin 10. apríl 2014 og játta kr. 150.000 av kontu 5210 Tórshavnar-, Ungdóms- og Listaskúla til endamálið, og at nevndin hevur ástaðarfund til komandi fund.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Nevndin var á ástaðarfundi í Kvøldskúlanum. Nevndin heitir á umsitingina um at gera uppskot til stigvísa umvæling og innrætting av hornahúsinum og høvuðsbygninginum, herundir kostnaðarmeting til næsta fund.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til umbyggingar- og umvælingarætlan av hølum og bygningum hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A. Winthers gøtu.

Við støði í nýggjari inniklimafrágreiðing verður mælt til, at drenað verður um húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og um húsini í Vørðsluni 4, umframt at bróta gólvið upp, har sum vesini eru á hædd 1 í Vørðsluni 4. Garðurin millum húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og Vørðsluna 4 skal eftir

ætlan takast niður, og viðurskiftini við septiktanga gerast um. Hetta arbeiðið er ætlanin at bjóða út sum undirhondsboð millum tveir veitarar. Soleiðis kann hesin parturin byrja skjótast og verða fyrst avgreiddur.

Tað er ikki ætlanin at gera nakað við bygningin í M.A. Winthers gøtu 5 í hesum umfari, men verður ætlandi partur av øðrum byggistigi seinni.

-o-

Tørvurin hjá kvøldskúlanum at betra um viðurskiftini til veving er stórur. Meiri pláss skal til hetta virksemið, umframt at verandi høli í J. H. Schrøters gøtu 1 (Einars Prent) eftir ætlan skulu brúkast til aðra undirvísing, sum hølini eru betri egnaði til, m.a. til "mál og mentan fyri útlendingar", føroyskt fyri útlendingar og onnur fremmandamál, sum nú húsast í Venjingarskúlanum um kvøldarnar.

Ætlanin er, at veving skal vera í erva í Vørðsluni 4. Í niðaruhædd skal tónleikur halda til (3 smærri tónleikahøli og eitt størri studio til samanspæl). Størra hølið kann eisini brúkast til smærri tónleikartiltøk, kórvenjingar og fyrilestarar. Við hesum hevur kvøldskúlin ikki longur tørv á hølum í Margarinfabrikkini, og sum ætlandi Klippfisk, ið higartil hevur hildið til í M.A. Winthers gøtu 1, fær í staðin. Í niðaru hæddini skal umframt tónleik eisini verða tekøkur og betraði vesiviðurskifti.

Nýggj høvuðsinngongd skal verða til bygningin í Vørðsluni. Høvuðsinngongdin verður flutt at verða úr norðara enda til langsíðuna eystureftir.

Mett verður, at fígging er ikki tøk til at umvæla húsini M.A. Winthers gøtu 1 í hesum byggistigi. Her skal ætlandi glaslist verða í neðra og seymistova í erva.

-o-

Kostnaðarmeting er gjørd fyri omanfyri nevndu arbeiði, innbúgv og útgerð v.m. Útreiðslur til nýggjar útsíður á bygningin til Vørðsluna 4 eru ikki tiknar við í kostnaðarmetingina, men liggur eftir ætlan í einum øðrum byggistigi. Tað sama er við útreiðslunum at gera skitsuuppskot til eina heildarætlan fyri økið.

Ætlanin er at fíggja omanfyri nevndu umvælingar, sum eru at meta sum fyrsta byggistig, av staðfestari minninýtslu í rakstri hjá kvøldskúlanum. Tøk játtan, um øll minninýtslan pr. 31. desember 2014 verður brúkt til endamálið, er kr. 3.352.000. Umvælingarnar eru tó so umfatandi, at tær mugu metast sum ein íløga..

Byggitíðin er mett til 7-8 mðr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á kvøldskúlanum mæla til at samtykkja uppskotið til umbyggingar- og umvælingarætlan, og til endamálið at játta kr. 3.352.000 av rakstrarkontu 5210 Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúli til íløgukontu 5275, Kvøldskúlin.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta pening av rakstrinum til íløgur og mælir til, at umvælingararbeiðið verður boðið út sum aðrar verkætlanir av slíkum slag, og at arbeiðið verður játtað av íløgum.

Jógvan Arge tekur støðu á einum seinni fundi og ynskir frágreiðing um, hvussu hetta avlopið í rakstrinum hjá Kvøld- og ungdómsskúlanum er íkomið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Jørð- og lendisarbeiði, sum serliga hevði til endamáls at drena runt ognirnar á M. A. Winthersgøtu 1 (Hornahúsið) og Vørðsluna 4, varð boðið út sum undirhondsboð.

Inn komu tvey tilboð.

| | |
|---|---|
| Sp/f David Nordendal | 967.100,00 kr u. mvg |
| Sp/f við Sjógv | 797.812,00 kr u. mvg |

Eftir samráðingar við bíligara tilboðsgevara, eru nakrar sparingar framdar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til at taka av tilboðið frá Sp/f við Sjógv, á krónur 692.412,00 kr. Upphæddin er u.mvg.

**Mentamálanevndin 20. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta peningin av íløgukontu 5275, Kvøldskúlin og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at umbyggja og umvæla bygningarnar hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A.Winthersgøtu heldur fram.

Sáttmáli til jørð- og lendisarbeiðið er gjørdur og tað arbeiðið er í gongd. Tað sama er galdandi fyri ráðgevarapartin, har kommunan sjálv kemur at standa fyri eftirlitspartinum. Ein heildarætlan fyri innrætting av øllum trimum bygningunum (M.A. Winthersgøta 1 og 5 umframt Vørðslan 4), umframt hvussu bygningarnir skulu klæðast í framtíðini, verður klár í næstum.

Við atliti at tøku játtanini, verður tað mest neyðuga raðfest ovast íroknað tað, sum er størsti tørvurin hjá Kvøldskúlanum í mun til virksemið.

Fríggjadagin 12. juni 2015 var lisitatión uppá innrættingarpartin til ein part av Kvøldskúlanum. Bodnir vóru 4 arbeiðstakarar at geva tilboð: Karstin A. Joensen, ÁTS, Valbjørn Dalsgarð og Eysturlon.

Trý tilboð komin.

| | |
|---|---|
| Sp/f Eysturlon | 1.071.486,25 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | 1.124.714,35 |
| Sp/f ÁTS | 1.207.256,39 |

Prísirnir eru uttan mvg.

Miðað verður ímóti  at hava sáttmála til innrættingarpartin kláran í viku 25.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Eysturlon og lata heimild til umsitingina at samráðast og gera sáttmála.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 131/15 Stuðul til felagshús á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 64/14 | 14/02134-13 |
| 10 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 154/15 | 14/02134-13 |
| 11 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 131/15 | 14/02134-13 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 110/14 | 14/02134-13 |
| 3 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 102/14 | 14/02134-13 |
| 4 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 140/14 | 14/02134-13 |
| 5 Fíggjarnevnd | 18.03.2015 | 77/15 | 14/02134-13 |
| 6 Mentamálanevndin | 18.03.2015 | 58/15 | 14/02134-13 |
| 7 Fíggjarnevnd | 22.06.2015 | 183/15 | 14/02134-13 |
| 8 Mentamálanevndin | 03.06.2015 | 143/15 | 14/02134-13 |
| 9 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 166/15 | 14/02134-13 |

## Málslýsing:
Argja Bóltfelag arbeiðir við ætlanum um at innrætta hæddina undir áskoðaraplássunum í AB-skýlinum, har gerast skulu umklæðingarrúm, goymslurúm og felagshøli. Í hesum sambandi hevur Argja Bóltfelag søkt um stuðul frá Fótbóltssambandi Føroya, og í skrivi, dagfest 13. desember 2012, varð boðað frá, at Fótbóltssambandið stuðlar AB við kr. 600.000 til nýtt felagshús á Argjum.

Síðani vendi Argja Bóltfelag sær til Tórshavnar kommunu um stuðul til arbeiðið. Tórshavnar kommuna hevur fingið kostnaðarmeting og tekningar frá Argja Bóltfelag, og samlaði kostnaðurin verður sambært kostnaðarmetingini kr. 8.264.239,50, íroknað 25% mvg.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at viðgera málið saman við íløguætlanini 2014.

**Ískoyti:**
Argja Bóltfelag heitir á kommununa um at fáa stuðul til at gera partar av arbeiðinum at innrætta skýlið til tess ikki at missa stuðulin frá FSF kr. 600.000.

Felagið hevur fingið tilboð uppá planering, stoypa gólv, múra rest av útveggum til almenn wc og goymslu/fýrrúm í báðum endunum, allar hurðar og øll vindeygu, øll innandura kloak- og frárensluviðurskifti og hitarør, og lutvíst rør til heitt og alt vatn. Tilboðið er kr. 1.178.530 u/mvg. Arbeiðið er mett at vera liðugt síðst í januar 2014.

Felagið bjóðar sær standa fyri arbeiðinum og søkir um kr. 600.000 í stuðli.

Tá hetta arbeiðið er gjørt, verður næsta stig liðugtgerð av báðum endunum, herundir at gera almennu wc-ini, hitaverk og rottanga. Eftir tað kunnu umklæðingarrúm v.m. gerast so hvørt fíggingin er tøk.

Treyt fyri stuðli er, at kommunan fær endaligan byggiroknskap til góðkenningar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 600.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 600.000 í stuðli av konto 5370 Stuðul til íløgur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt góðkent, at Sjúrður Olsen fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at stoypa, planera v.m. sum omanfyri lýst er gjørt. Harumframt hevur kommunan grivið nýggja leiðingsgrøv til kloakk, vatn, el, fipur v.m. umframt annað lendisarbeiði fyri kr. 660.000, sum ætlanin hevur verið skal býtast javnt millum íløgujáttan til AB-skýlið og rakstrarkontu á teknisku fyrisiting.

AB søkir nú um at halda fram við arbeiðinum við at innrætta sjálvan bygningin, samlað kostnaðarmeting við innheintaðum tilboðsprísum er kr. 5,4 mió u/mvg. Talan er um fýra umklæðingarrúm, dómararúm, almenn wc v.m. og felagshøli. Partur av útreiðslunum er til innbúgv o.a. uml. kr. 200.000. Upplýst er kommununi, at AB hevur søkt FSF um stuðul til liðugtgerð av skýlinum.

Á íløguætlanini fyri 2014 er játtan kr. 4,2 mió tøk til ítróttarøkið á Argjum. Helvtin av teim áðurnevndu kr. 660.000 ætlast fíggjað av hesi játtan, eftir eru sostatt kr. 3.870.000, sum íroknað kommunalt mvg er 67% av tilboðskostnaðinum.

Skal AB standa fyri arbeiðinum, er neyðugt at fáa upplýst, hvussu felagið ætlar at fíggja írestandi upphæddina kr. 1,5 mió. Umframt stuðul frá FSF, hevur felagið lagt upp til fígging við sjálvbodnum arbeiði.

<u>Treytir:</u>
Kommunan skal tí seta sum treyt fyri fígging ella stuðli, at talan er um endaligan stuðul til byggingina, at felagið upplýsir, hvussu írestandi upphæddin verður fingin til vega, og at øll neyðug byggiloyvi og myndugleikaloyvi annars eru fingin til vega, áðrenn byggingin byrjar.

Eisini verður at seta sum treyt, at umboð fyri kommununa tekur lut á øllum projektfundum, og at stuðul verður goldin út à conto eftir umbøn fyri gjørt og váttað arbeiði. Harumframt er krav, at stuðul verður fluttur bert um serstaka byggikontu uttanfyri raksturin hjá felagnum annars, og at endaligur byggiroknskapur verður latin kommununa at góðkenna.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til

- at játta kr. 3.870.000 til at innrætta hølini undir AB-skýlinum og kr. 330.000 til gjørt leiðingsarbeiði, sum tekniska fyrisiting hevur staðið fyri, í alt kr. 4,2 mió av íløgukontu 5775 ítróttaranlegg, og
- at AB stendur fyri at fremja arbeiðið at innrætta hølini eftir omanfyri nevndu treytum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 1. mai 2014**: Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

Annfinn Brekkstein; Bjørghild Djurhuus; Bogi Andreasen; Elin Lindenskov; Halla Samuelsen; Heðin Mortensen; Helena Dam á Neystabø; Jákup Dam; Jógvan Arge; Sigrun Mohr; Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson hava Játtað at samtykkja málið við aðru viðgerð. Marin Katrina Frýdal hevði ikki svarað tá freistin var farin. Málið verður at staðfesta á fyrst komandi býráðsfundi.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Argja Bóltfelag hevur í skrivi 9. november 2014 váttað fyri kommununi byggiroknskap, at arbeiðið fyri tann áður játtaða stuðulin er gjørt. Felagið upplýsir eisini, at fyri at gera hølini liðug, vanta uml. kr. 1,3 mió í. Felagið søkir kommununa um hesa upphædd at gera hølini liðug og vísir samstundis á, at felagið hevur stórar hølistrupulleikar, har yvir 20 lið deilast um tvey skiftirúm í AB-húsinum.

FSF hevur í skrivi 6. mars 2015 til Argja Bóltfelag boðað frá, at felagið hevur fingði longt freistina at fáa skiftirúmsumstøðurnar til dómarar í lagi til í seinasta lagi 2. apríl 2015. Um hetta er ikki komið í rættlag, verður felagið at finna nýggjan heimavøll. FSF vísir í hesum sambandi til treytirnar í fylgiskjali 1, pkt, 20 í FSF reglugerðini rundskriv um treytir til leikvøll (Vallarreglugerð 2015).

Argja Bóltfelag upplýsir, at tað, sum eftir er at gera, er undirtak og loft undir skýlinum, málaraarbeiði, elarbeiðið, fast og leyst innbúgv, óvæntað, ráðgeving v.m. fyri í alt kr. 1.233.000 u/mvg.

Felagið hevur higartil staðið fyri arbeiðinum, og hevur til endamálið fingið játtað stuðul frá kommununi og FSF. Í sambandi við stuðulsjáttanina í 2014 setti kommunan sum treyt, at talan var um endaligan stuðul til byggingina.

Um stuðul skal játtast til at gera skýlið liðugt, skal víkjast frá hesi treyt. Samlaði kommunali stuðulin til verkætlanina verður tá munandi hægri enn vanligt í sambandi við stuðulsmál til bygging, at tað kann fatast sum kommunal verkætlan eisini í ljósinum av, at kommunan eigur bygningin.

Alternativ er, at kommunan yvirtekur verkætlanina við at fíggja hana fult og heilt og ger byggingina lidna. Játtanartørvur tá verður kr. 1,6 mió uttan byggiharraútreiðslur, men við mvg.

Ein leigu- og brúksavtala eigur at verða gjørd millum Argja Bóltfelag og kommununa, har Argja Bóltfelag umframt leigugjald stendur fyri øllum útreiðslum til rakstur og viðlíkahaldi av felagshølunum undir skýlinum.

Fígging til íløgutørvin kann fáast til vega av óbrúktum løgukarmi, eitt nú av løgukarminum til Gundadalshøllina, sum ikki væntast brúkt í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin vísa til tilmælið frá 2014 um endaligan stuðul.

**Mentamálanevndin 18. mars 2015:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr heitir á umsitingina um neyvari upplýsingar um kostnaðir, møgulig krøv í sambandi við yvirtøku av verkætlanini, og treytir í sambandi við leigu- og brúksavtalu.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu, tá dagført yvirlit pr. 18. mars 2015 fyriliggur yvir tøkar íløgupphæddir 2015 við framflytingum av óbrúktum frá gomlum árum.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. juni 2015:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Útsett.

**Ískoyti:**
Sum omanfyri lýst hevur Argja Bóltfelag í skrivi dagf. 9. november 2014 søkt kommununa um kr. 1.300.000 í stuðli til at gera felagshølini liðug. Í sambandi við meirinntøkur fyri 2014 hevur býráðið á fundi 21. mai 2015 samtykt at játta kr. 1.300.000 ætlað til liðugtgerð av felagshúsinum á Argjum.

Í sambandi við stuðulsjáttanina í 2014 setti kommunan sum treyt, at talan var um endaligan stuðul til byggingina. Samtyktin í býráðnum er at meta sum frávik frá hesum.

Sambært innlatnum byggirokniskapi dagf. 1. juni 2015 hevur samlaða arbeiðið at innrætta felagshølini, ið byrjaði í 2013, kostað kr. 6.670.000 u/mvg. Kommunan hevur higartil játtað kr. kr. 4.470.000 í stuðli. Vanliga játtar kommunan 30% í stuðli, men fordømi eru um játtaðan stuðul hægri enn 30%. Um kommunan játtar 1.300.000 aftrat í stuðli felagshølini á Argjum, verður samlaði stuðulin kr. 5.770.000 ella 86,5% av samlaðu byggiútreiðslunum.

Stuðulsskipanin eigur at verða eftirhugt saman við øðrum stuðulsskipanum á mentamálaøkinum, sí mál 14/04926.

Sum áður lýst, skal kommunan í avtalu við felagið lata felagnum brúksrætt til felagshølini, sum felagið hevur innrættað. Felagið skal somuleiðis standa fyri øllum rakstrar- og viðlíkahaldsútreiðslum av felagshølunum undir skýlinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.300.000 av kontu 5775 Ítróttaranlegg sum stuðul til at gera felagshølini liðug sum frávik frá vanligu stuðulsskipanini, og at gjørd verður avtala millum kommununa og Argja Bóltfelag um brúksrætt og treytir hesum viðvíkjandi av felagshølunum undir skýlinum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

# 132/15 Val av limum í valstýrið fyri løgtings- og fólkatingsval í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 19.03.2015 | 59/15 | 15/00871-1 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 132/15 | 15/00871-1 |

**Málslýsing**:

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Vald vórðu Jórun Petersen, Johannis Petersen og Finnbjørn Simonsen.

**Samtykt um teldupost 13. juni 2015:** Ein av valstýrislimunum í Kaldbak, Finnbogi Simonsen hevur boðað frá, at hann er burturstaddur valdagin. Sostatt manglar ein stýrislimur, tí ongir eykalimir eru valdir. Málið varð sent við telduposti 13. juni 2015, har heitt varð á býráðslimir um at taka støðu til at velja Snorra á Bøgarði sum eykalim í valstýrið í Kaldbak.

Samtykt við 12 atkvøðum fyri: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Sigrún Mohr, Bjørghild Djurhuus, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt at velja Snorra á Bøgarði sum eykalim.

# 133/15 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini (2012-2883)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 220/14 | 14/03450-18 |
| 2 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 133/15 | 14/03450-18 |

## Málslýsing:

Sambært §50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýri velja umboð í skúlastýrini.

2 kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal 1 kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 11 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Skúlin á Argjahamri, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli og Nólsoyar skúli.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu:
**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Helena Dam á Neystabø | Elin Lindenskov |
| Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |

**Venjingarskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Tróndur Sigurdsson |
| Bogi Andreasen | Sjúrður Olsen |

**Eysturskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Tróndur Sigurdsson | Sigrún Mohr |
| Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |

**Sankta Frans skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Bjørhild Djurhuus | Helena D. Á Neystabø |
| Bogi Andreasen | Sjúrður Olsen |

**Skúlin á Argjahamri:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Helena D. Á Neystabø | Halla Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |

**Hoyvíkar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Bjørghild Djurhuus | Tróndur Sigurdsson |
| Jógvan Arge | Jákup Dam |

**Kollfjarðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Sigrún Mohr | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Sigrún Mohr |
| Jógvan Arge | Jákup Dam |

**Nólsoyar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Sigrún Mohr |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Velbastaðar skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Tróndur Sigurdsson | Halla Samuelsen |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt hesar broytingar:

**Kommunuskúlin:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Sigrún Mohr |
| Helena Dam á Neystabø | Elin Lindenskov |

**Kaldbaks skúli:**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Jógvan Arge | Jákup Dam |

**Býráðið fyri læstum hurðum 12. desember 2013:** Umrøtt.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Valdir vórðu:

**Nólsoyar skúli:**

| *Fastur limur:* | *Tiltakslimur* |
|---|---|
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt at avtaka skúlaráðini fyri Kommunuskúlan og Venjingarskúlan og at velja nýggjar limmir fyri

**Skúlin á Fløtum**

| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
|---|---|
| Halla Samuelsen | Sigrún Mohr |
| Helena Dam á Neystabø | Elin Lindenskov |

# 134/15 Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 133/15 | 15/00969-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.06.2015 | 149/15 | 15/00969-1 |
| 3 Býráðsfundir | 22.06.2015 | 134/15 | 15/00969-1 |

**Málslýsing**:
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri ognina matr.nr. 91a, Hamrabøur í Kollafirði. Eftir uppskotinum er pláss til umleið 21 grundstykkir millum 510 og 600 $m^2$ til sethús plus 2 grundstykkir fram við á Homrum. Grundstykkini hava tvørfall uppá millum 6 og 8 metur. Útstykkingin hevur umleið 330 m av vegi, 16 eyka p-pláss og gøtusamband til á Homrum. Vegurin er 8 m breiður, harav 1 m gongubreyt á hvørjari síða.

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting (sí skjal 1).

Skjal nr. 1. Kostnaðarmeting.
Skjal nr. 2. Støðumynd.
Skjal nr. 3. Skurðir
Skjal nr. 4 Longdarskurður

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum, at kunna teknisku nevnd um ætlanina og at útvega fígging til gerð av projektuppskoti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging til projektuppskot.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 100.000 av konto 6175, keyp og søla, til projekstuppskot.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Borgarstjórin kunnaði um**
At býráðið fyri læstum hurðum hevði selt tvær ognir. Grundstykki vil vinnuvirksemi í Marknagili, j. Nr. 15/02035 og grundstykki til 32 samanbygd hús undir Kongavarða j. Nr. 15/01590

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 20:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrun Amalia Mohr | |